# AÐALFUNDUR HJÁ KOMMUNUFELAGNUM

# 2021

Kommunufelagið



Útgevari: Kommunufelagið
Uppseting: Nudlavirkið
Prent: Føroyaprent

Svanamerktur prentlutur 541 705

# Innihaldsyvirlit


1. Vælkomin . . . . 4
2. Korona . . . . 7
3. Samfelag í framgongd hóast koronu . . . . 7
4. Virksemi felagsins farna árið . . . . 8
5. Annað virksemi í Kommunuhúsinum . . . . 14
6. At enda . . . . 18
7. Um Kommunufelagið . . . . 20
8. Kommuna og kommunuhugtakið . . . . 25
9. Búskaparlig høvuðstøl fyri 2020 . . . . 27
10. Inntøkur . . . . 28
11. Rakstrarútreiðslur . . . . 36
12. Íløgur . . . . 37
13. Fíggjarstøða . . . . 37
14. Gongdin í fólkatalinum . . . . 39
15. Heildarætlan fyri rekruttering av starvsfólki . . . . 40




*Skúvoy*

*Mynd: Ólavur Frederiksen, faroephoto*



*Bíðirøð til koronakanning*

*Mynd: Ólavur Frederiksen, faroephoto*

# 1. Vælkomin

Góðu kommunustýrislimir, gott fundarfólk!

Hjartaliga vælkomin á aðalfund hjá Kommunufelagnum!

Ein serlig heilsan til tykkum kommunustýrislimir, sum eru vald á fyrsta sinni: Vælkomin!

Samstundis vil eg at nýta høvið at takka undanfarnu kommunustýrunum fyri arbeiðið, tey hava gjørt, seinastu fýra árini.

Kommunustýrini í Føroyum hava eitt fólksligt kjølfesti, eina undirtøku millum manna, ið øll onnur samfeløg, sum vit samanbera okkum við, bert kunnu droyma um.

29 kommunur við knappliga 200 kommunustýrislimum eru í dag karmur um staðbundna fólkaræðið í Føroyum. Vit hava slakar 40 túsund veljarar í Føroyum, so í miðal umboðar hvør kommunustýrislimur færri enn 200 veljarar. Sambandið millum politisku skipanina og borgaran er tískil tætt, og møguleikarnir hjá borgarunum at ávirka politisku skipanina – og harvið raðfestingar í nærsamfelagnum – eru framúr góðir.

Valluttøkan við seinasta kommunuval var í miðal oman fyri 84%, sum er met í norðurlendskum samanhangi. Hetta er ein gongd, ið vit sum samfelag kunnu vera errin av. Flestu av okkara grannalondum hava í mong ár stríðst við júst øvutu gongdina, har áhugin fyri staðbundnum valum yvirhøvur er minkandi.

Vit kunnu eisini staðfesta, at valluttøkan á kommunuvalinum tann 10. november var størri enn 80% í øllum teimum 29 kommununum. Hetta er okkum kunnugt fyrstu ferð í nýggjari tíð. ( Sí talvu 1 )

Vit kunnu tískil staðfesta, at staðbundna fólkaræðið í Føroyum hevur tað gott, og at borgarar veruliga munnu kenna seg at hava ávirkan á førda politikkin í nærsamfelagnum.

Meira enn helmingurin ella 55% av kommunustýrislimunum vóru nývaldir hesa ferð. At áhugin fyri staðbundna fólkaræðinum er vaksandi, er kanska eisini sjálvsagt. Stór vælferðarøki eru seinni árini løgd til kommunurnar. Samstundis eru tað kommunurnar, sum í stóran mun skapa karmar fyri ítrótti, mentan og frítíðarvirksemi yvirhøvur, eins og tær skapa karmar fyri vinnu um landið. Hetta merkir, at tað eru kommunustýrini, vit kommunustýrislimir, sum við okkara raðfestingum í stóran mun ávirka vælferðina og trivnaðin hjá øllum okkara borgarum, bæði børnum, vaksnum og eldri.

Sum kommunufelag mugu vit áhaldandi verja henda rættin hjá fólki at skipa seg á staðnum, soleiðis at eisini tey, ið eftir okkum koma, fara at hava tann framíhjárætt at skipa seg í staðbundnar eindir við heimildum at skipa og ávirka egin viðurskifti.

Henda rættin verja vit best við at standa saman um eitt sterkt Kommunufelag.

Eg fari í hesi fyrstu formansfrágreiðing míni at leggja dent á nøkur yvirskipað mál, sum hava týdning fyri okkum, sum varða av kommununum, heldur enn neyvt at ganga í gjøgnum allar smálutir, sum hava verið fyri seinasta árið.

Eins og seinnu árini viðger seinni parturin av frágreiðingini tann kommunala búskapin. Seinni parturin inniheldur eisini ein part, sum sum snýr seg um eina heildarætlan fyri rekrutering av starvsfólki til eldraøkið og dagstovnaøkið, sum Kommunufelagið og KAF eru farin í gongd við.

Enn einaferð hjartaliga vælkomin á aðalfund hjá Kommunufelagnum!

**Talva 1**

Valluttøka í prosentum

| Kommuna | 2008 | 2012 | 2016 | 2020 |
|---|---|---|---|---|
| Eiðis kommuna | 86,6 | 87,82 | 88,2 | 89,6 |
| Eystur kommuna | 84,4 | 88,6 | 87,8 | 88,1 |
| Fámjins kommuna | 88 | 83,72 | 95,9 | 93,6 |
| Fuglafjarðar kommuna | 84,7 | 84,96 | 90 | 90,6 |
| Fugloyar kommuna | 86,4 | 94,44 | 97,8 | 94,7 |
| Hovs kommuna | 82,8 | 74,76 | 89,5 | 87 |
| Húsar kommuna | 95,2 | 74,36 | - | - |
| Húsavíkar kommuna | 78,5 | 86,54 | 96,8 | 90,9 |
| Hvalbiar kommuna | 84 | 81,93 | 90,2 | 89,2 |
| Hvannasunds kommuna | 79,3 | 79,02 | 87,9 | 84,1 |
| Klaksvíkar kommuna | 81,9 | 82,04 | 87,4 | 81,7 |
| Kunoyar kommuna | 95 | 80,2 | 86,4 | 93,5 |
| Kvívíkar kommuna | 77,1 | 77,7 | 78,6 | 81,5 |
| Nes kommuna | 84,6 | 84,19 | 85,9 | 84,9 |
| Porkeris kommuna | 93,2 | 91,02 | 95,7 | 93,4 |
| Runavíkar kommuna | 79,8 | 79,36 | 85,6 | 85,1 |
| Sands kommuna | 91,1 | 92 | 94,3 | 91,3 |
| Sjóvar kommuna | 76,9 | 81,08 | 82,2 | 88,2 |
| Skálavíkar kommuna | 82,6 | 77,78 | 85,5 | 94,1 |
| Skopunar kommuna | 83,5 | 87,04 | 92,2 | 91,6 |
| Skúvoyar kommuna | 83,6 | 88,37 | 78,4 | 89,5 |
| Sumbiar kommuna | 90,1 | 89,8 | 89,3 | 90,2 |
| Sunda kommuna | 80,5 | 79,01 | 85,3 | 86,2 |
| Sørvágs kommuna | 84 | 83,05 | 83,6 | 87,2 |
| Tórshavnar kommuna | 72,4 | 77,37 | 79,2 | 81 |
| Tvøroyrar kommuna | 82,6 | 83,33 | 90,1 | 90,1 |
| Vága kommuna | 82,4 | 82,21 | 84,5 | 83,8 |
| Vágs kommuna | 80 | 81,92 | 87,8 | 89,5 |
| Vestmanna kommuna | 75 | 77,11 | 83,1 | 82,4 |
| Viðareiðis kommuna | 89,2 | 90,43 | 92,9 | 91 |
| **Miðal** | | | **83,8** | **84,1** |



Mynd: Ólavur Frederiksen, faroephoto

# 2. Korona

Tað, sum eftirtíðin fer at minnast farna árið fyri, er fyrst og fremst koronu.

Í desember 2019 vóru fyrstu tilburðirnir av koronavirus, sum ikki áður hava verið at sæð hjá menniskjum, staðfestir í Kina. Teir fyrstu tilburðirnir vóru í Wuhan í Hubeilandslutinum í eystur Kina. Síðani breiddi virusið seg skjótt um allan heimin.

Í Føroyum varð fyrsti tilburðurin staðfestur 3. mars, og tá ið fráboðan kom frá løgmanni um at steingja samfelagið á grækarismessu, vóru tríggir tilburðir staðfestir. Hóast samfelagið avgjørt kundi verið betur fyrireikað, so kunnu vit staðfesta, at samfelagið hevur staðið seg væl, og at avleiðingarnar higartil hava verið sera avmarkaðar samanborið við onnur lond.

Á grækarismessu boðaði landsstýrið frá, at umfatandi tiltøk vórðu sett í verk. Fyri kommunurnar merkti hetta m.a., at dagstovnar og skúlar vórðu stongdir. Røktarheim og sambýli vórðu stongd fyri øllum vitjandi, og samfelagið annars varð at kalla lagt lamið, og mælt varð til, at øll arbeiddu heimanífrá, og alment skuldu ikki fleiri enn 10 fólk verða savnað.

Avbjóðingarnar í sambandi við koronafarsóttina vóru nógvar, og hetta merkti í stóran mun eisini virksemið hjá Kommunufelagnum. Serliga viðvíkjandi eldraøkinum og dagstovnaøkinum vóru nógvir spurningar.

Royndirnar, vit hava gjørt okkum, vísa, at nógvir manglar eru í heilsufakligu tilbúgvingini. Serliga eldraøkið var frá byrjanini í einari truplari støðu. Ímeðan kunning, ráðgeving og vegleiðing varð væl skipað av sentralum stovnum í okkara grannalondum, so var eldraøkið meir ella minni slept upp á fjall. Ongar vegleiðingar komu frá sentralum myndugleikum.

Kommunufelagið samskipaði tí eina heilsufakliga ráðgeving, partvíst við hjálp frá Páli Weihe, yvirlækna, og partvíst við hjálp frá fakligum dygdarmennarum á sjálvum eldraøkinum.

Nógvar avgerðir vórðu tiknar, nógv tilmæli og vegleiðingar v.m. vórðu gjørd; og vit kunnu ikki annað enn vera errin av teimum leiðslum og teimum starvsfólkum á eldraøkinum runt um í Føroyum, sum hava fingið eldraøkið ígjøgnum hesa kreppuna, uttan at nøkur smitta er komin inn á økið. Hetta er eitt bragd, sum vit eiga at takka okkara starvsfólkum fyri.

Við dagstovnaøkinum var støðan eitt sindur øðrvísi. Um miðjan apríl var Koronaráðgevingin stovnsett við fakfólki frá millum annað Arbeiðs- og brunaeftirlitinum og Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu.

Í sambandi við at skúlar og dagstovnar skuldu lata upp aftur, sendi Koronaráðgevingin út vegleiðingar um, hvussu teir skuldu bera seg at. Talan var í stóran mun um tilmæli, sum vóru gjørd í samráði við viðkomandi partar, millum annað Kommunufelagið.

Kommunurnar kundu síðani laga tilmælini til staðbundin viðurskifti. Samanumtikið kann sigast, at hesin leistur eydnaðist væl, hóast foreldur og starvsfólk stundum vóru ørkymlað av støðuni.

# 3. Samfelag í framgongd hóast koronu

Tað gongur framhaldandi lutfalsliga væl í Føroyum, hóast ein alheims kreppa hevur valdað seinasta góða árið.

Seinnu árini hava vit í Føroyum upplivað stóran búskapar- og fólkavøkstur. Enntá nú koronakreppan herjar allan heimin, hevur føroyski búskapurin ikki verið fyri nøkrum veruligum bakkasti. Men trøini vaksa ikki inn í himmalin. Føroyski búskapurin fer komandi tíðina uttan iva at verða nógv merktur av koronukreppuni, og eingin ivi er um, at komandi tíðina verður ikki nakar stórvegis vøkstur í inntøkunum hjá kommununum.

Hóast útlitini ikki eru tey bestu, so heldur fólkatalið fram at vaksa. Fólkatalið í Føroyum er nú farið upp um 53.000, samstundis sum talið av løntakarum ongantíð hevur verið hægri, men trendurin, sum lýsir rákið í løntakaratalinum, vísir, at hóast løntakaraskarin alsamt veksur, so veksur hann munandi spakuligari, enn hann hevur gjørt. Seinastu mánaðirnar er vøksturin nærum steðgaður upp.

Tann stóri fólkavøksturin seinastu 7–8 árini er í størstan mun komin av eini stórari nettotilflyting, ið er munurin millum tilflyting og fráflyting, og í minni mun av burðaravlopinum, ið er munurin millum føðd og deyð. Hetta er nú broytt nakað, tí burðaravlopið gevur eitt munandi størri íkast til fólkavøksturin hetta 12-mánaðaskeiðið enn undanfarnu árini.

Menningin av samfelagnum hevur tó ikki verið eins stór og støðug kring alt landið. Norðoya-, Eysturoyar-, Streymoyar- og Vága sýslur hava síðani aldarskiftið havt fólkavøkstur, men sunnaru sýslurnar, Sandoy og Suðuroy, hava havt eina minking í fólkatalinum. Gongdin í hesum økjum er hin sama, sum tann vit hava sæð á útoyggjum í áratíggju. Íbúgvatalið er lækkað munandi, og fólkasamansetingin skeiklað, tí samstundis sum fráflytingin er stór, velja fá ung fólk at flyta til – ella aftur til – økini. Tað hevur við sær færri fólk í arbeiðsførum aldri, og at ein lutfalsliga størri partur er uttanfyri arbeiðsmarknaðin.

Hóast vit hava sæð batar í hesum økjum, eisini seinastu árini, so er støðan í hesum nærsamfeløgum ikki haldgóð. Burðaravlopið er einki ella negativt, og vandin er stórur fyri at koma í eina ónda ringrás við enn størri fráflyting, afturstigum og við tíðini eini beinleiðis niðurlaðing.

Felags fyri hesi øki er, at tey ikki hava fast samband til meginøkið í Føroyum. Týdningurin av føstum sambandi sæst týðiliga í hagtølunum. Vøksturin í fólkatalinum er javnstórur í Tórshavnarøkinum, Eysturoy og Norðuroyggjum, umleið 1,7–1,8%. Men verður hugt at Sandoyarøkinum, er lutfalsligi vøksturin 2,4%  seinastu 12 mánaðirnar og sostatt tann størsti í landinum. Hetta vísir fram um nakað annað týdningin av føstum sambandi millum oyggjarnar, tí brádliga broytingin fyri Sandoyarøkið kemst fyrst og fremst av, at Sandoyartunnilin nú nærkast.

Tí er lítil ivi um, at framtíðin hjá økjum í Føroyum í stóran mun eru treytað av, at tey verða knýtt at meginøkinum við føstum sambandi. Vit kunnu í hesum sambandi gleðast um, at tað ikki longur er ein spurningur í politisku skipanini, hvørt vit skulu hava fast samband við alt suðurøkið í Føroyum. Spurningurin er heldur, nær hetta gerst veruleiki. Tí eyðsæð er hetta ein fyritreyt fyri menningini í hesum økjum.

# 4. Virksemi felagsins farna árið

Uppgávurnar hjá kommunala geiranum eru fjøltáttaðar, og virksemið hjá Kommunufelagnum endurspeglar í stóran mun hetta. Virksemi felagsins fevnir bæði um ítøkiliga ráðgeving til kommunalu fyrisitingarnar og hjálp til málsviðgerð innan tey málsøki, ið kommunurnar røkja. Harumframt luttekur felagið í ymsum arbeiðum, sum á ymsan hátt hava felags kommunalan áhuga, og har felagið gjøgnum sína luttøku kann hava ávirkan á, hvussu øki og lóggáva verða ment og skipað.

Í almenna rúminum roynir felagið í øllum lutum at verja áhugamálini hjá kommunala geiranum. Niðanfyri verður greitt frá teimum týdningarmestu málunum hetta seinasta árið.

## Eftirmetingin av eldraøkinum

Sambært løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum kom í gildi 1. januar 2015, skal lógin endurskoðast fimm ár eftir, at hon er sett í gildi.

Sjøtul er nú settur á arbeiðið.

Arbeiðsbólkur er mannaður av umboðum fyri Kommunufelagið, Almannamálaráðið, Fíggjarmálaráðið og Umhvørvis- og vinnumálaráðið.

Eisini verður settur ein politiskur stýrisbólkur við landsstýrisfólkunum í Almannamálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, formanninum og næstformanninum í Kommunufelagnum og einum skrivara.

Arbeiðið er skipað í tríggjar partar:

- Lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.: Hugt verður at ymisku ásetingunum í lógini, og broytingartilmæli verða gjørd, har ásetingar eru ógreiðar ella ikki virka eftir ætlan.
- Samstarvslógin: Hugt verður at teimum avbjóðingum, ið eru við verandi bygnaði, og um neyðugt, verður komið við tilmælum um broytingar.
- Fíggingarleisturin: Lýst verður, hvussu fíggingarleisturin hevur roynst higartil, og hugt verður eftir, hvørjar broytingar kunnu gerast fyri at rætta møguligar veikleikar í fíggingarleistinum og fyri betur at tryggja eldraøkið fíggjarliga frameftir.

## Eftirmeting av tænastulógini

Eftirmetingin av tænastupartinum á eldraøkinum er skipað soleiðis, at útgangsstøði er tikið í galdandi eldralógini við tilhoyrandi kunngerðum. Gjørd verður ein meting av, hvussu lógin virkar, herundir um lógin er nøktandi karmur um virksemið, ið kommunurnar hava á eldraøkinum. Eftirmetingararbeiðið er lagt soleiðis til rættis, at leiðslurnar fyri eldrasamstørvini hava fingið høvi at lýsa tænastuvirksemið á eldraøkinum og at koma við upplýsingum og viðmerkingum um viðurskifti, ið eftir teirra meting áttu at verið broytt.

Almannamálaráðið hevur somuleiðis givið Almannaverkinum høvi at lýsa tað virksemið, ið Almannaverkið hevur, og sum markar upp ímóti eldraøkinum. Hetta fyri at tað skal bera til at fáa eina heildarmynd av støðuni á eldraøkinum.

Tá greiningararbeiðið er liðugt, verður støða tikin til, um neyðugt er at gera broytingar í lóggávuni; og um so er, verða viðkomandi tingingar millum land og kommunur um tað, sum er neyðugt at broyta.

## Eftirmeting av samstarvslógini

Hugt verður at teimum avbjóðingum, ið higartil hava verið í kommunalu samstørvunum. Kommunufelagið, Kommunala eftirlitið og møguliga eisini Fíggjarmálaráðið greina, hvørjar trupulleikar, tey hava sæð í samstørvunum, síðani hesi vóru skipað fyri góðum seks árum síðani.

Síðani verða møgulig tilmæli um broytingar løgd fyri politiska stýrisbólkin til støðutakan.

Tað er eingin loyna, at bæði kommunufeløgini í 2014 prinsipielt vóru ímóti teimum tvungnu samstørvunum, og hinvegin mettu tað rímiligt, at samstørvini vóru skipað sjálvboðin.

Tað er heldur eingin loyna, at ósemjur hava verið millum felagið og Kommunala eftirlitið um ymiskar tulkingar av lógini. Vónandi verða hesar ósemjur fingnar av vegnum við eftirmetingini.

## Eftirmeting av fíggingarleistinum

Ein týðandi partur í arbeiðinum at eftirmeta eldraøkið, er eftirmetingin av fíggingarleistinum.

Sambært arbeiðssetninginum skal lýsast, hvussu fíggingarleisturin hevur roynst higartil, og síðani skal hyggjast eftir, hvørjar broytingar kunnu gerast.

Hetta arbeiðið er farið í gongd, og tað eru starvsfólk úr umsitingini hjá Kommunufelagnum, sum saman við starvsfólki úr Fíggjarmálaráðnum standa fyri hesum partinum.

Kommunurnar yvirtóku eldraøkið 1. januar 2015, og til at reka økið fingu kommunurnar allan skattin av inn-

gjøldum til eftirløn umframt eina árliga afturbering fyri kostnaðin av skattligum serskipanum. Hinvegin yvirtók landið tann partin av skattinum av kapitalpensjónum, sum kommunurnar høvdu fingið frammanundan. Eftirlønarskatturin má sigast at vera sjálvur bulurin í fíggingini. Hann verður latin kommunum eftir tali av borgarum 67 ár og eldri – tó er parturin hjá kommununum í Sandoy 30% størri.

Higartil má sigast, at vøksturin í samlaða fíggingarleistinum hevur verið hóskandi. Árligi vøksturin hevur seinastu seks árini verið umleið 5% árliga í miðal. Hetta er á leið tað sama, sum útreiðsluvøksturin á eldraøkinum hevur verið. Ein útreiðsluvøkstur á 5% árliga kann ljóða av nógvum, men hetta er sami vøkstur, sum sjúkrahúsverkið hevur havt sama tíðarskeið. Harumframt má havast í huga, at kommunurnar á flestu økjum hava uppraðfest økið.

Stóri vøksturin í fíggingarleistinum kemst partvís av stóru fólkatilflytingini seinastu seks árini, og partvís av árligu hækkingini av bundna eftirlønargjaldinum sambært eftirlønarlógini, har gjaldið hækkar við 1% árliga fram til 2026. Talan er sostatt um nakað fyribils, og staðfestast kann við vissu, at stóri vøksturin í inntøkunum fer ikki at halda fram nógv ár afturat. Hann fer at halda uppat. Men hinvegin kann eisini sigast við vissu, at vøksturin í útreiðslunum til eldraøkið fer ikki at halda uppat. Tvørturímóti fer hann rættiliga at taka dik á seg komandi árini. Sigast kann tí við vissu, at munurin millum útreiðslur og fígging fer at vaksa tey komandi 30 árini.

Tað er tí altavgerandi fyri fíggjarliga haldførið í kommunala búskapinum frameftir, at land og kommunur finna eina semju í hesum máli, ið tryggjar kommunum trygt inntøkugrundarlag framyvir. Ikki minst fyri tær fíggjarliga veiku kommunurnar, ið eisini eru tær kommunurnar, har lutfalsliga flest gomul búgva.

Víst verður í hesum sambandi til ársfrágreiðingina fyri í fjør, har avbjóðingin við eldraútreiðslunum fekk drúgva umrøðu, og har víst varð á fleiri ymiskar møguleikar at minka um eldraútreiðslurnar og økja um inntøkugrundarlagið hjá kommununum.

# Samskiftisleistur við landsstýrið

Kommunufelagið hevur fyri tíð síðani heitt á løgmann um at fáa eitt munagott og formliga skipað samskifti og samstarv millum land og kommunur um týðandi samfelagsmál.

Felagið hevur lagt upp til fastar fundir millum løgmann, avvarðandi landsstýrisfólk og leiðsluna í Kommunufelagnum. Endamálið við hesum føstu fundum er at umrøða týðandi mál, sum eru ávegis í landsstýrinum – mál, sum kunnu hava ávirkan á kommunurnar. Soleiðis kann Kommunufelagið gerast ein mennandi viðspælari, heldur enn støðugt at eiga leiklutin sum mótspælari, tá málini skulu viðgerast í løgtinginum og í almenna rúminum.

Ynski er eisini um, at Kommunufelagið í góðari tíð verður kunnað um, hvussu fíggingarkarmar og fíggjarlóg koma at ávirka kommunala geiran. Við hesum kann Kommunufelagið fyrireika seg til komandi broytingar, og samstundis í størri mun taka lut í eini tilgongd og verða virkin viðspælari í at finna haldgóðar loysnir á fíggjarliga partin, eins og gjørt hevur verið á ymiskum økjum, tá t.d. uppgávur eru fluttar frá landinum til kommunurnar at umsita.

Í øllum okkara grannalondum er eitt væl skipað samstarv millum landsins kommunufelag og landsins stjórn. Hóast ósemjurnar eru tær somu hjá teimum sum hjá okkum, so er stevið og forstáilsið partanna millum betri enn hjá okkum.

Avtala er nú gjørd um at hava fyrsta fundin millum landsstýrið og leiðsluna í felagnum við hesum evnum á skrá:

- Landsins fíggjarstøða við serligum atliti til kommunala geiran. Fokus verður sett á demografisku gongdina í samfelagnum og avbjóðingar í hesum sambandi.
- Landsstýrið og Kommunufelagið seta orð á størstu avbjóðingarnar, ið eru viðkomandi í viðurskiftunum millum land og kommunur.
- Hvussu kann samskiftið og samstarvið millum land og kommunur styrkjast, soleiðis at vit fáa tær frægastu loysnirnar sum frá líður.
- Tilbúgvingarlógin.

# Kommunalur bústaðarpolitikkur

Støðan á bústaðarmarknaðinum hevur verið nógv umrødd seinastu árini. Kommunurnar hava ein týðandi leiklut í hesum sambandi, og hava tí í felag sett sær fyri at royna at orða ein yvirskipaðan kommunalan bústaðarpolitikk.

Kjakið higartil hevur í mestan mun snúð seg um, hvussu flest møguligir bústaðir – helst leigubústaðir – kunnu fáast til vega skjótast møguligt, og hvussu almenn og privat útleiga kunnu javnsetast. Endamálið við einum kommunalum bústaðarpolitikki er tó eitt heilt annað. Tað er meira prinsipielt og langskygt. Endamálið er at fáa greiðu á, hvønn leiklut og hvørjar ábyrgdir kommunurnar skulu hava á bústaðarmarknaðinum, og hvørji amboð og hvørjar heimildir kommunur eiga at hava – og ikki hava. Har heimildir vanta, er ætlanin at venda sær til landsstýrið fyri at fáa hesar til vega.

Í Føroyum hava fólk sjálv skyldu til at útvega sær ein bústað. Í teimum førum, har hetta ikki ber til, er tað landið (Almannaverkið), ið skal ávísa ein bústað. Kommunur hava sostatt ikki skyldu til at útvega egnum borgarum bústað. Siðvenjan er, at kommunur útvega byggilendi til grundstykki og gera útstykkingar, og í byggisamtyktum áseta, hvar, hvat og hvussu bygt verður. Hesi viðurskifti eru rættiliga greið, og ætlanin er tí ikki at gera stórvegis við hendan partin. Heldur er ætlanin at hyggja nærri at teimum viðurskiftum, ið eru meira ógreið, og har ásetingar vanta.

Arbeiðið at orða ein kommunalan bústaðarpolitikk er



*Skúvoy*

*Mynd: Ólavur Frederiksen, faroephoto*

longu farið í gongd. Ein arbeiðssetningur er gjørdur, og arbeiðið fer fram á sama hátt sum í øðrum málum. Tað vil siga, at umsitingin í Kommunufelagnum saman við starvsbólkinum fyrireikar ymisku evnini í arbeiðssetninginum til viðgerð á stýrisfundi. Onkur evni eru longu liðugt umrødd, og roknað verður við, at komið verður á mál við arbeiðinum áðrenn ársenda 2021.

Niðanfyri verður í stuttum greitt frá, hvørji viðurskifti ætlanin er at taka felags støðu til í sambandi við ein kommunalan bústaðarpolitikk.

## VIÐURSKIFTINI MILLUM KOMMUNUR OG FELAGIÐ BÚSTAÐIR:

Ásetingar finnast í lóg um húsalánsgrunn, og eisini eru einstakar verkætlanir framdar í samstarvi millum kommunur og felagið Bústaðir. Eisini hava fleiri kommunur veitt felagnum góðar sømdir, serliga í sambandi við grundøki, men eisini fastogn.

Havandi í huga, at Bústaðir verður sagt at vera fremsta bústaðarpolitiska amboð landsins, so er tað av stórum týdningi, at kommunurnar gera greitt, hvønn leiklut tær meta seg eiga at hava í mun til felagið, og hvussu eitt framtíðar samstarv skal skipast.

## LANGTÍÐARLEIGAÐ BYGGILENDI:

Langtíðarútleigan av byggibúnum lendi til leigubústaðir verður ofta nevnt sum ein møguleiki fyri at tryggja fleiri leigubústaðir fyri ein sámiligan leigukostnað. Eisini hava einstakar kommunur víst á henda møguleikan og sóknast eftir greiðari reglum.

Sambært fyrisitingarligari mannagongd skulu leigusáttmálar longri enn 30 ár góðkennast av Eftirlitinum, men harumframt má sigast, at ongar beinleiðis relevantar reglur finnast í mun til júst útleigan av byggibúnum lendi.

## BÚSTAÐARSKYLDA:

Tað finst eingin lógarheimild hjá kommununum at áleggja bústaðarskyldu, og talan er um eitt inntriv, ið er ov stórt til, at tað kann áleggjast í einari byggisamtykt. So um bústaðarskylda er eitt av amboðunum, ið kommunurnar vilja hava at regulera bústaðarviðurskiftini í kommununi við, so má hetta ásetast í lóg. Spurningurin er tó, um kommunurnar vilja hava slíka heimild, og hvussu, og í hvørjum førum, hon skal kunna áleggjast.

## ELDRAÍBÚÐIR:

Í 2019 fingu kommunurnar heimild at seta á stovn eldraíbúðir at leiga út til borgarar, ið eru 60 ár og eldri. Kommunufelagið mælti í hoyringarskrivi frá, at kommunurnar fingu hesa heimild, tí tað var so ógreitt, hvussu hon skal umsitast. Heimildin varð fingin til vega í skundi upp undir løgtingsval, og uttan at tað neyðuga fyrireikandi arbeiðið var gjørt. Neyðugt er tí við greiðari reglum og møguliga í serstakari lóg.

## HÚS, HAR ONGIN BÝR:

Í fleiri kommunum eru lutfalsliga nógv hús, har ongin býr. Tað vil siga, at eigarar búgva í øðrum kommunum, og húsini eru ikki tøk til at langtíðarleiga. Tey eru at meta sum frítíðarhús.

Hesi hús eru ein útreiðsla fyri kommununa, bæði beinleiðis og óbeinleiðis. Beinleiðis, tí kommunan hevur skyldu at veita tænastur til øll hús, men eisini óbeinleiðis, tí húsini ikki eru tøk til onnur at keypa ella langtíðarleiga, og tað hevur so aftur við sær færri skattgjaldarar og minni skattainntøkur. Tað er tí ikki órímiligt, at tær kommunur, ið vilja tað, kunnu fáa eitt amboð til at tryggja sær gjøld frá eigarunum av hesum húsum.

Spurningurin er so, hvussu hetta kann gerast á einfaldan, vælskipaðan og gjøgnumskygdan hátt, sum allar kommunur kunnu taka undir við.

Hugsanin er tó ikki, at allar kommunur skulu áleggja tílíkt gjald. Hugsanin er hinvegin, at tær kommunur, ið vilja tað, skulu hava møguleikan. Eisini kann hugsast, at gjald einans verður álagt í ávísum økjum í kommununi – til dømis smærri bygdum í kommununi.

**LEIGUBÚSTAÐIR YVIRHØVUR:**

Sum greitt frá omanfyri, hava kommunurnar ávísar heimildir til at samstarva við felagið Bústaðir, og eisini til at seta á stovn eldraíbúðir. Men ongar heimildir eru í sambandi við at byggja og reka leigubústaðir sum heild, ella til at stovna bústaðarfeløg, seta pening í bústaðarfeløg o.s.fr.

Kommunurnar hava yvirhøvur stóran áhuga í einum rúmligari bústaðarmarknaði, har fleiri leigubústaðir – serliga íbúðir – verða bygdir. Spurningurin er tí, um eisini kommunurnar skulu hava ein virknari leiklut, har kommunurnar sjálvar taka stig til at útvega leiguíbúðir.

# Vælferðarlógin

Tann 1. januar 2021 kom nýggja vælferðarlógin í gildi. Hetta er eitt lógarverk, ið kemur í staðin fyri forsorgarlógina. Vælferðarlógin er í høvuðsheitum grundarlag undir tí virksemi, ið Almannaverkið hevur, men lógin skilmarkar eisini ábyrgdarbýtið millum land og kommunur á sosiala økinum og á eldraøkinum. Tá lógaruppskotið til nýggju vælferðarlógina varð lagt fram í løgtinginum, vóru ymisk sokallað fylgiuppskot løgd fram, har ymisk onnur lóggáva varð broytt, soleiðis at hetta samsvaraði við nýggju vælferðarlógina.

Fyri kommunurnar var serliga viðkomandi, at uppskot varð lagt fram um at broyta eldralógina, serliga viðvíkjandi teimum sokallaðu markamótspurningunum, t.e. spurningum um, hvør geiri hevur skyldu at veita einum borgara ávísa tænastu, t.d. einum borgara undir 67 ár við demensi. Kommunufelagið átalaði hetta, tí fatanin hjá Kommunufelagnum var, at broytingar í lóggávuni, sum er grundarlag undir virkseminum á eldraøkinum, eigur at fara fram samsvarandi úrslitinum av eftirmetingini av eldraøkinum og í samráði við kommunala geiran.

Løgtingið tók í ein ávísan mun sjónarmiðini hjá Kommunufelagnum til eftirtektar og útsetti ein part av gildiskomuni av broytingunum í eldralógini, til tingingar hava verið millum land og kommunur u

m hesi viðurskifti.

# Tvingsilslógin

Nýggja tvingsilsslógin kom í gildi 1. januar 2021. Fyri kommunala geiran er henda lóggávan serliga viðkomandi fyri eldraøkið, tí í lógini verða sett krøv um heimild fyri tiltøkum og ávísum inntrivum í sjálvsavgerðarrættin hjá borgarum. Hetta merkist í gerandisdegnum, t.d. tá eldraøkið metir tað vera neyðugt at nýta GPS- og peilingarskipanir til minnisveik, ella tá neyðugt er at flyta fólk millum stovnar móti teirra vilja.

# Nýggja dátuverndarlógin

Nýggja dátuverndarlógin kom í gildi 1. januar 2021. Sum heild hevur gildiskoman verið at sæð aftur í almenna rúminum. Lógin setur krøv til kommunurnar sum almennur myndugleiki um, hvussu tær handfara og viðgera persónupplýsingar, og hetta hevur við sær, at kommunurnar, eins og allir aðrir samfelagsaktørar, hava skyldu til at vera tilvitaðar um týdningin av at savna inn, viðgera, handfara og verja persónupplýsingar hjá borgarum.

Eitt av krøvunum í nýggju lógini er, at hvør einstøk kommuna skal tilnevna eitt dátuverndarfólk, ið skal ráðgeva og vegleiða kommununum í dátuverndarspurningum.

Allar kommunurnar hava tilnevnt dátuverndarfólk. Tað er tó ymiskt, hvussu kommunurnar hava loyst hetta í praksis. Onkrar kommunur hava tilnevnt egin starvsfólk til uppgávuna, meðan aðrar hava gjørt avtalu við privatar veitarar um at loysa hesa uppgávuna sum eina tænastuveiting.

Sannlíkt er, at krøvini í nýggju dátuverndarlógini, og serliga rættindini hjá borgarunum í hesum sambandi, við tíðini koma at broyta arbeiðshættir og arbeiðsgongdir í kommunala geiranum. Kommunurnar eiga tí at umhugsa, um hesar avbjóðingar kunnu loysast felagskommunalt.

Kommunufelagið hevur í dátuverndarlógini fingið eitt lógartryggjað umboð í Dáturáðið, ið er partur av Dátueftirlitinum, ið er evsti myndugleiki innan dátuvernd í Føroyum.

# Óljóð frá skipum

Óljóð frá skipum við bryggju í føroysku havnunum hevur verið eitt afturvendandi evni í fleiri ár.

Landsstýrismaðurin við ábyrgd fyri økinum kom undan jólum við einum uppskoti til kunngerð, ið var ætlað at loysa trupulleikan, har serligur dentur varð lagdur á at áleggja havnunum at gera áhaldandi ljóðkanningar, har trupulleikin er staðfestur. Kommunufelagið viðgjørdi hetta uppskot innanhýsis saman við havnamyndugleikunum, og semja var um, at uppskotið ikki var egnað at loysa trupulleikan. Hesum boðaði Kommunufelagið landsstýrismanninum frá.

Ein bólkur undir Kommunufelagnum arbeiðir nú saman við viðkomandi áhugabólkum at finna eina hóskandi og praktiska loysn á, hvussu óljóð frá skipum kann tálmast.

# Avtalan við Nám

Kommunufelagið hevur vegna kommunurnar tingast við Nám um eina standardavtalu, sum í innihaldi kann vera grundarlag undir einum felags grundstøði fyri samstarvi millum Nám og kommunurnar um tær tænastur, sum Nám veitir kommununum viðvíkjandi undirvísingartilfari í fólkaskúlanum. Tað er tó einstaka kommunan sum ger av, um hon vil hava eina slíka avtalu við Nám, og tað eru einstaka kommunan sum er sáttmálapartur mótvegis Námi.

Fyri kommunurnar kann tað vera heldur ógreitt, hvussu prísstøðið hjá Námi passar við, hvat ymsu kommunurnar í roynd og veru brúka upp á undirvísingartilfar í fólkaskúlunum. Helst er tað soleiðis, at tað er ymiskt, hvat kommunurnar í dag rinda til Nám, men hetta snýr seg møguliga meira um, hvussu kommunurnar raðfesta undirvísingartilfar, enn hvat er ein rættur ella hóskandi prísur fyri tænasturnar. Nám hevur tí útgreinað prísin við frágreiðing um prísásetingina fyri ymsu tænasturnar, og hetta sæst í fylgiskjali til avtaluna.

Uppskotið til avtalu sum Kommunufelagið og Nám eru komin ásamt um, kann nýtast sum grundarlag undir eini avtalu millum Nám og einstøku kommununa.

Við tað at undirvísingartilfar alsamt verður meira talgilt, henda javnt og samt broytingar á økinum, sum viðvíkja avtaluna við Nám. Tí er eisini avrátt, at avtalan verður endurskoðað eftir trimum árum, og at tað er regluligt samskifti millum umboð úr kommunala geiranum og Nám um virksemið sambært avtaluni.

# Ábyrgdarbýtið á fólkaskúlaøkinum viðvíkjandi KT

Undirvísingar- og mentamálaráðið hevur sett ein arbeiðsbólk at greina ábyrgdarbýtið viðvíkjandi KT í fólkaskúlanum, og at koma við uppskoti um, hvussu ábyrgdarbýtið møguliga kann gerast greiðari.

Arbeiðsbólkurin er mannaður við umboðum úr ráðnum, Undirvísingarstýrinum, Námi, Lærarafelagnum og Kommunufelagnum.

Hetta arbeiðið er sprottið burturúr afturvendandi ivamálum um, hvør hevur ábyrgd av KT-trygd í fólkaskúlunum, og hetta arbeiðið skal eisini síggjast sum ein partur av arbeiðinum við eini KT-heildarætlan fyri alt undirvísingarverkið, sum ráðið somuleiðis hevur sett í verk.

Arbeiðið hevur verið skipað soleiðis, at roynt hevur verið at fáa yvirlit yvir allar tær KT-skipanir, ið ein vanligur fólkaskúli hevur, hvørja funktión hesar skipanir hava í skúlunum, og hvør hevur ábyrgd av teimum upplýsingum, ið verða viðgjørdar í hesum skipanum. Við støði í hesum verður síðani greinað og støða tikin til, um hesar KT-skipanir skulu vera partur av KT-heildarætlanini fyri undirvísingarverkið, og hvussu ábyrgdarbýtið skal vera hareftir.

# Tilbúgvingarlógin

Í løtuni liggur uppskot um broyting í løgtingslóg um tilbúgving í løgtinginum.

Endamálið við uppskotinum er:
- At skipa kommunalu tilbúgvingarnar í 9 tilbúgvingareindir fyri at styrkja um leiðsluna og fakliga partin av tilbúgvingini.
- At seta á stovn ein felags kommunalan fráboðanarsentral, sum kommunurnar skulu bera kostnaðin av.
- At áleggja tilbúgvingunum at hava ávísa samskiftisútgerð til tvørfakliga samskiftið.

Kommunufelagið hevur gjørt vart við, at felagið ikki kann góðtaka, at eitt so grundleggjandi inntriv við tvungnum samstørvum verður gjørt mótvegis kommununum og kommunalu skipanini, uttan at kommunurnar yvirhøvur hava verið við í fyrireikandi arbeiðinum, og enn minni eru kunnaðar um málið frammanundan. Tvungin samstørv millum kommunur eru á eldraøkinum og barnaverndarøkinum, men hesi hava hóast alt verið skipað í lóg, eftir at umfatandi og áralangt fyrireikingararbeiði hevur verið millum land og kommunur. Áhaldandi at leggja innihaldsliga og fíggjarliga tung málsøki í tvungin millumkommunal samstørv er óheppin framferðarháttur, sum elvir til minni gjøgnumskygni, ógreiðari ábyrgdarbýti og hóttir fólkaræðisliga grundarlagið undir kommununum, tí ein støðugt størri partur av innihaldinum í kommununum verður lagdur uttanfyri fólkavaldu kommunustýrini at taka avgerð um. Og at gera hetta, uttan at kommunurnar eru tiknar við uppá ráð, er beinleiðis at gera seg inn á kommunala sjálvræðið á grundleggjandi hátt.

Kommunufelagið metir eisini, at tað er prinsipielt skeivt, at landsstýrismaður fær heimild at seta felags kommunalan fráboðanarsentral, sum kommunurnar skulu bera kostnaðin av. Kommunufelagið mælir harumframt til at kanna møguleikarnar fyri at stovna ein fráboðanarsentral heldur enn at hava tríggjar.

Kommunufelagið hevur tí mælt til, at málið verður liggjandi í nevnd, og at samskifti fæst í lag millum ráðið og Kommunufelagið, áðrenn farið verður víðari.



*Mynd: Ólavur Frederiksen, faroephoto*

# Viðurskifti viðvíkjandi SEV

Á eykaaðalfundi hjá SEV 19. februar varð samtykt, at bygnaðurin í orkufelagsskapinum SEV skal eftirmetast, og um hildið verður neyðugt, skal ítøkiligt tilmæli gerast um broytingar í verandi bygnaði. Møgulig tilmæli um broytingar í bygnaðinum verður lagt fyri eykaaðalfund seinni í ár.

Fimm borgarstjórar og nevndarformaðurin fyri SEV manna eftirmetingarbólkin, sum sjálvur orðar arbeiðssetningin. Fyri at røkka besta úrslitinum, kann bólkurin bæði leita sær ta uttanhýsis ráðgeving, sum neyðug er, og innan úr felagnum.

Í fyrstu atløgu virkar skrivstovan hjá Kommunufelagnum sum skrivstova hjá bólkinum.

Borgarstjórarnir í nevndini eru:

- Heðin Mortensen, Tórshavnar kommuna
- Karl H. Johansen, Klaksvíkar kommuna
- Tórbjørn Jacobsen, Runavíkar kommuna
- Bjarni Prior, Vága kommuna
- Kristin Michelsen, Tvøroyrar kommuna

Seinasta tíðin hevur eisini verið merkt av ósemjum millum SEV og kommunurnar øðrumegin og Vinnu- og umhvørvismálaráðið hinumegin.

Kommunufelagið hevur, eins og SEV, átalað framferðina hjá Umhvørvisstovuni í málinum um vindútboð við Gellingarklett. Vindútboðið gongur ímóti ásetingum í elveitingarlógini og ímóti vanligum viti og skili. Hetta triðja stóra vindútboðið hjá Umhvørvisstovuni í meginøkinum kemur ov tíðliga og er á skeivum staði. Hetta merkir, at SEV í fleiri ár fer at keypa mátt frá privatum veitara, sum ikki kann gagnnýtast. Í stuttum merkir hetta stórar eykaútreiðslur, sum føroyski brúkarin í síðsta enda kemur at borga fyri.

# 5. Annað virksemi í Kommunuhúsinum

Undir Kommunufelagnum er eisini annað virksemi, sum stutt skal greiðast frá niðanfyri.

## Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF)

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er arbeiðsgevarafelagið hjá kommununum, og umboðar kommunalu- og millumkommunalu arbeiðsgevararnar, SEV og IRF á arbeiðsmarknaðinum.

Kjarnuuppgávan hjá KAF er at samráðast við fakfeløg um sáttmálar um løn- og setanarviðurskifti fyri starvsfólk, ið starvast á kommunala sáttmálaøkinum. Harumframt hevur felagið til uppgávu at vegleiða arbeiðsgevarunum um lønar- og setanarmál, flokkingarmál, sáttmálaspurningar og onnur arbeiðsmarknaðarmál. Fyri at røkka arbeiðsgevarum, starvsfólkunum í kommunalu umsitingum og øðrum, raðfestir felagið kunning og ymisk upplýsandi tiltøk, evnisdagar, sáttmáladagar o.l.

## Samráðingarheimildin hjá kommununum

Heimildina at samráðast hevur felagið frá eigarunum, Kommunufelagnum, SEV og IRF. Hinu megin hevur Fíggjarmálaráðið við ásetingini í § 5, stk. 5 í kommunustýrislógini eina góðkennandi heimild í mun til sáttmálar og lønir, ið KAF ger. Sambært eini bókstavligari fatan av lógini skulu allir sáttmálar, avtalur og lønir, ið kommunurnar gera, góðkennast av Fíggjarmálaráðnum. KAF meinar hinvegin, at lógarásetingin skal skiljast meira út frá sínum endamáli.

Eitt av endamálunum við nýggju Kommunustýrislógini er, at kommunurnar skulu stýra egnum viðurskiftum í so stóran mun sum til ber, og soleiðis skal eisini ásetingin í § 5, stk. 5 skiljast. Ásetingin er ikki ætlað til, og gevur heldur ikki Fíggjarmálaráðnum heimild, at forða fyri, at kommunalar lønir eru hægri ella lægri enn lønir hjá landinum. Ásetingin er ætlað til, at tað sum heild skal ansast eftir, at javnvág er millum lønir hjá landi og kommunum fyri at halda eitt javnt lønarlag.

## Sáttmálasamráðingar og korona

Korona setti sín serliga dám á sáttmálasamráðingarnar í 2020. Samráðingarnar byrjaðu um heystið í 2019, og frá miðjum februar, tá korona fór at gera um seg, hildu mong seg aftur at hittast á samráðingarfundum og líknandi.

Um hetta mundið var KAF í samráðingum við fleiri fakfeløg, og serliga var KAF komið væl ávegis í samráðingunum við Starvsfelagið, sum frammanundan hevði gjørt semju við Fíggjarmálaráðið, soleiðis at karmarnir fyri sáttmálaskeiðið vóru lagdir. KAF og Starvsfelagið vóru samd um karmarnar og at kalla eisini um innihaldið í eini semju fyri tíðarskeiðið, men semja varð ikki undirskrivað, tá allar samráðingarnar á arbeiðsmarknaðinum steðgaðu upp vegna koronu.

Í hesum sama tíðarskeiði vóru KAF og Heilsuhjálparafelagið til seming. Semingsstovnurin royndi semju millum partarnar, júst tá løgmaður um hálvan mars heitti á allar føroyingar um at vísa varsemi grundað á óvissu støðuna við koronu.

Semja varð undirskrivað saman við Heilsuhjálparafelagnum, ein semja samansett av lønarhækkan í krónum fyrra árið og prosentum seinna árið. Sáttmálin hjá KAF við Heilsuhjálparafelagið gongur út 1. oktober 2021.

KAF valdi í koronutíðarskeiðinum at gera 1 árs sáttmálar við millum annað Skipara- og Navigatørfelagið og handverkarafeløgini, soleiðis at KAF seinni út á árið fekk betri fortreytir at meta um, hvørja ávirkan korona hevði á samfelagsbúskapin og á framtíðar lønarhækkanir á arbeiðsmarknaðinum.

Lønarhækkanin á almenna arbeiðsmarknaðinum var í mai mánaði broytt samsvarandi lønarhækkanini á privata arbeiðsmarknaðinum. Hetta hevði við sær, at fakfeløg, sum gjørdu semju áðrenn korona tók seg upp, fingu eina hægri lønarhækkan enn feløgini, sum gjørdu semju aftaná 1. mai 2020.

Hóast semjan millum KAF og Starvsfelagið varð undirskrivað 3. juni 2020, aftan á broyttu karmarnar, so fingu limir felagsins í starvi hjá kommununum somu lønarhækkan, sum var galdandi áðrenn koronu, eins og limir felagsins í starvi hjá landinum. KAF legði dent á, at starvsfólk innan sama sáttmálaøki skulu hava somu løn fyri sama arbeiði. Starvsfólk í starvi hjá landinum, svarandi til 2/3 av liminum í Starvsfelagnum, høvdu fingið lønarhækkan samsvarandi kørmunum undan koronu. Tí var tað altavgerandi, at limirnir í Starvsfelagnum í starvi hjá kommununum, altso síðsti 1/3, fekk somu lønarhækkan.

KAF metti semjuna við Starvsfelagið at liggja innan fyri samráðingarheimildina í § 5, stk. 5 í Kommunustýrislógini. Fíggjarmálaráðið vrakaði semjuna 5. juni, við teirri grundgeving, at karmarnir aftaná koronu vóru broyttir. Semjan varð ikki vrakað sambært lógini við eini fyrisitingarligari

grundgeving, men við eini politiskari grundgeving. Broyttar fíggjarligar fortreytir hjá landskassanum kunnu ikki brúkast sum lógligt atlit at vraka ein kommunalan sáttmála/semju; einasta lógliga atlitið sambært § 5, stk. 5 er, at tryggjast skal eitt javnt lønarlag millum land og kommunur.

At Fíggjarmálaráðið á hendan hátt ger seg inn á sjálvsavgerðar- og samráðingarrættin hjá kommununum, kunnu vit ikki bara standa og hyggja at. KAF heitti tí á Fíggjarmálaráðið um at taka semjuna upp til nýggja viðgerð. Felagið gjørdi Fíggjarmálaráðnum púra greitt, at góðkendi ráðið ikki semjuna, so fór KAF at taka onnur stig. Fíggjarmálaráðið góðkendi semjuna við Starvsfelagið tann 1. juli 2020.

Tað er umráðandi at standa saman um stóru málini og at verja sjálvsavgerðarrættin hjá kommununum; hetta kom týðiliga til sjóndar í hesum málinum, har bæði Kommunufelagið og allir borgarstjórar í landinum sýndu KAF sín fulla stuðul.

KAF og Fíggjarmálaráðið hava tikið arbeiðið við at gera eina rammuavtalu upp aftur til viðgerðar. Ein avtala, sum skal tryggja, at partarnir halda seg til gjørdar avtalur, og at samstarvið verður skipað eftir einum leisti, sum byggir á eitt yvirskipað samstarv, m.a. við regluligum fundum millum nevndina í KAF og Fíggjarmálaráðið um sáttmálasamráðingar, arbeiðsmarknaðarviðurskifti og onnur mál av felags áhuga.

# Átøk og verkætlanir

Orsakað av m.a. støðuni við koronu vóru átøk, evnisdagar og sáttmáladagar, ætlaðir í 2020, fluttir til 2021. Higartil í ár hevur felagið skipað fyri skeiði í nýggju persónsupplýsingarlógini (GDPR). Næst á skránni eru evnisdagur um setanarprógv, sáttmáladagar á fleiri økjum m.a. fyri maskinmeistarar, handverkarar og um sáttmálarnar á eldraøkinum og á dagstovnaøkinum.

Nógv fokus hevur verið á starvsfólkatørvinum, bæði á dagstovnaøkinum og á eldraøkinum. Tað eru kommunalir stovnar, ið hava ilt við at fáa faklærd starvsfólk, og útlitini sýnast ikki at batna. KAF og Pedagogfelagið skipa í næstum fyri felags arbeiðsdøgum, har partarnir skulu umrøða støðuna og royna at finna loysnir upp á avbjóðingarnar.

Í næstum fara KAF og Heilsuhjálparafelagið at gera eina kanning av setanarviðurskiftunum hjá heima- og heilsuhjálparum. Seinni skal skipast fyri felags evnisdegi, har ljós skal varpast á setanarviðurskiftini og yrkisførið á økinum.

KAF er farið undir at kanna møguleikarnar fyri at professionalisera innsavningina av kommunalum hagtølum. Okkara ynski fyri framtíðina er at hava støðugt atkomulig hagtøl. Ikki bara hagtøl, ið vit hava tørv á í sambandi við samráðingar, men eisini onnur kommunal hagtøl, sum eru trupul at fáa fatur á. Talan er um verkætlan, sum felagið arbeiðir við saman við umsitingini í Kommunufelagnum.

Saman við Kommunufelagnum er KAF í støðugari menning. Kommunali geirin er seinnu árini vorðin munandi breiðari. Fleiri málsøki og alt fleiri og torgreiddari uppgávur eru at taka sær av. Kommunurnar umsita stór og rakstrartung øki, ið mugu umsitast so skynsamt, sum til ber. Skal hetta eydnast, mugu vit ansa eftir, at sáttmálarnir fyri tey mongu starvsfólk, ið starvast hjá okkum, verða hildnir á einum støði, ið fíggjarorka er til.

# Cosmic verkætlanin

Kommunufelagið samskipar vegna eldraøkini Cosmic verkætlanina, sum er staðsett við einum verkætlanarleiðara í Kommunuhúsinum

Cosmic er sjúklingajournalskipan fyri allar borgarar í Føroyum. Eldraøkini varða av nøkrum av teimum mest torgreiddu og veikastu sjúklingunum. Fleiri av borgarunum, sum eldraøkini varða av, fáa ikki sjálv greitt frá síni sjúkrasøgu ella endurgivið frá eini læknavitjan.

Heimasjúkrarøktin møtir nýggjum sjúklingum hvønn dag, og hesi kunnu vera í øllum aldri. Við Cosmic fáa avvarðandi partar innan heilsugeiran eina felags skrásetingarskipan við felags minni, og hetta er eitt gott amboð at veita borgarunum trygga og góða tænastu.

Vegna millum annað koronustøðuna, var neyðugt at gera broytingar í verkætlanini. Støðan er nú, at umleið 200 starvsfólk í eldraøkinum hava fingið lesirættindi til skipanina, og hetta er ein hjálp í kliniska arbeiðinum. Arbeiðið við at gera klárt til eldraøkini at skjalfesta í skipanini byrjar aftur í heyst. Eftir tíðarætlanini verður verkætlanin liðug í desember 2024.

# Barnaverndarstova Føroya

Barnaverndarstovan virkar fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkið í Føroyum. Hetta við at veita ráðgeving til barnaverndartænasturnar kring landið, at umsita Fosturforeldraskipanina og at umsita Barnahúsið.

Virksemið hjá Barnaverndarstovuni var, eins og hjá øðrum, merkt av koronutilmælunum, og ein lutfalsliga stórur partur av ráðgevingini fyrra hálvárið snúði seg um, hvussu samvera millum foreldur og børn, sum vóru sett heiman, kundi verða skipað uttan at seta tilmælini til viks.

Nógv orka er løgd í at einshátta málsviðgerðina á barnaverndarøkinum, sum hevur havt við sær nógv skeiðsvirksemi seinasta árið. Vit hava savnað leiðararnar fyri barnaverndartænasturnar fyri saman at stinga út í kortið, hvussu hetta verður gjørt á skilabestan hátt. Eisini hava vit havt fleiri skeið innan málsviðgerð og fyrisitingarrætt. Dentur hevur verið lagdur á at styrkja løgfrøðiliga førleikan hjá barnaverndartænastunum. Við góðum vilja frá øllum síðum hevur hetta hepnast væl at fremja við fyriliti fyri koronu umvegis telefon, teldu og fundum og skeiðum kring landið við so fáum luttakarum, sum mælt hevur verið til.

Ein av týðandi uppgávunum hjá Fosturforeldraskipanini er at røkja skránna við fosturforeldrum, tað vil siga millum annað at bera so í bandi, at skikkað fosturforeldur eru tøk, tá tørvur er á tí. Tá barn verður sett heiman, verður altíð fyrst roynt at finna fosturforeldur, sum antin eru næstringar ella úr netverkinum hjá barninum, tí gransking vísir, at hetta ofta er tað besta fyri barnið. Fyri farna ár er at fegnast um, at talið á nýggjum fosturforeldrum er lutfalsliga høgt. Í 2020 komu 21 nýggjar umsóknir um at gerast fosturforeldur í skránna. Av hesum vóru næstringar sjey í tali og átta úr netverkinum hjá barninum. Tað vil siga stívliga 2/3 av nýggju fosturforeldrunum. Fyri hetta eiga barnaverndartænasturnar rós uppiborið, tí hetta vísir, at tær í síni málsviðgerð eru komnar fram til hesar loysnir. Tað vóru ikki fleiri fosturforeldur, sum av sínum eintingum bjóðaðu seg fram sum fosturforeldur í 2020 enn onnur ár.

Í mars og apríl 2020 noyddist Fosturforeldraskipanin at umleggja regluliga sambandið millum stovnin og fosturheimini til telefon, men longu fyrst í mai kundi sambandið halda fram sum vanligt, og heimavitjanir takast upp aftur.

Við sjey árum á baki ber til at geva ábendingar um rák út frá hagtølum fyri virksemið hjá Barnahúsinum. Barnahúsið er karmur í sambandi við mál um ágang móti børnum, tá tørvur er á tvørfakligum samstarvi millum barnaverndartænastu, løgreglu og/ella heilsuverk. Avvarðandi myndugleikar møta barninum í Barnahúsinum fyri at fáa greiðu á viðurskiftum hjá barninum og at finna fram til, í hvønn mun barnið hevur verið fyri ágangi, og í hvønn mun barninum tørvar serkøna hjálp. Talið á endaðum málum hjá Barnahúsum var 25, sum er á leið á sama stigi sum undanfarin ár. Kynsbýtið á børnunum, hvørs mál vóru viðgjørd í Barnahúsinum, er púra javnt fyri 2020. Yvir seinastu fimm árini er tó yvirvág av gentum. Kynsbýtið á teimum, sum vóru undir illgruna fyri at hava framt ágang móti børnum var 19 menn og 8 kvinnur.

# SSP Samstarvið

Tá ið SSP varð sett á stovn fyri góðum tíggju árum síðani og fór til verka, var mótstøða hjá nógvum skúlafólkum um, at enn ein skipan trokaði seg inn á skúlan. Hetta er ikki støðan í dag. Nú vil eingin vera SSP Samstarvið

**Talva 2**

Barnaverndarmál





Mynd: Ditte Mathilda Joensen

fyriuttan. Stóra takið er nú at fáa skipanina at virka á dagstovnaøkinum, ið kommunurnar eiga fult og heilt.

Í Føroyum eru yvir 5000 børn undir skúlaaldri, og fleståll ganga á stovni. Tað átti verið lagamanni at fingið fyribyrgjandi arbeiðið á dagstovnunum at borðið til, men hetta er ikki uttan trupulleikar. Tað krevur tøk og hugburðsbroyting í kommunala geiranum at geva fyribyrging ans og síggja, at barnagarðar, vøggustovur, dagrøkt og frítíðarskúlar eisini eru týðandi partur í fyribyrgjandi arbeiðinum.

Vit eru í eini tíð, har rúsevni hava fingið nógva umtalu í miðlunum og skapt ótta millum foreldur. Myndugleikar ressast við og vilja gera sítt til at fyribyrgja, at rúsevni fáa fáa fastatøkur á ungum. Um somu tíð eru vit vitni til, at ungfólk stríðast við sálarkvøl, so sum angist og stúran fyri ikki at røkka til.

Tíverri er eingin ið spyr til dømis: »Hvussu ber tað til, at okkara samfelag føðir nýggjar brúkarar til rúsevni?«. Sannleikin er, at tey, sum koma sær í óføri, í flestu førum hava havt sítt at stríðast við heilt frá barnsbeini, hóast tey hava verið í hondunum á starvsfólkum á dagstovnum og allarhelst barnaverndartænastu. Stovnar og fyriskipanir, ið kommunurnar eiga.

Hóast støðan stundum tykist ráðaleys, er ikki at gevast á hondum. Tann góði boðskapurin er, at tað ber til at seta skipanir í verk, ið, sum frá líður, eiga at gera mun. SSP hevur ítøkilig fyribyrgjandi amboð til at taka, ið kunnu brúkast bæði á dagstovnum og skúlunum, har foreldrini eru tann týdningarmesti samstarvsfelagin. Eitt av teimum er »TÍTT« – eitt amboð at fáa eyga á børn og ung í viðkvæmari støðu og sum bindur saman fakliga arbeiðið tvørtur um geirar.

Sum dømi kann nevnast: »Hvussu tryggja vit okkum, at børn og ung í Suðuroy koma væl undan«. Eitt samstarv, har dagstovnar, dagrøkt og skúlar tvørtur um kommunumørk taka lógvatak saman. Hetta er ein tilgongd, ið fer fram í fleiri økjum í landinum, men enn er langt á mál.

»Hvussu tryggja vit okkum, at børn og ung koma væl undan í Føroyum«. Hetta gerst bara, um fyribyrgjandi arbeiðið fær dygga undirtøku frá starvsfólkum á økinum, og at politikarar síggja dygdina í at fremja felags atgerðir og skipaðar mannagongdir. Sum ein borgarstjóri hevði á munni: »Meskarnir skulu vera so trongir, at eingi børn detta niður ímillum«.

## SSP – kjølfest í barnaverndarøkjunum




Á smábarnaøkinum verður miðað eftir at savna leiðslurnar tvær ferðir um árið.

# 6. At enda

Eingin ivi er um, at áhugamálini hjá kommununum eru best tryggjað í einum savnaðum og sterkum kommunufelagsskapi. Vit mugu ásanna, at tørvurin á einum sterkum felagsskapi er størri nú enn nakrantíð áður, hóast tað við hvørt kann vera avbjóðandi at finna neyðugu semjurnar.

Tí har 29 kommunur skulu virka saman, finnast sjálvsagt eisini ósemjur. Hetta ber boð um fjølbroytni og staðfestir eisini ymisku fyritreytirnar hjá kommununum, men ikki minst ber hetta boð um eitt virkið fólkaræði. Í einum fólkaræði byggir alt grundarlag á semjur, og eingin fær altíð sín vilja ígjøgnum.

Men saman standa vit altíð sterkari, og vit í Kommunufelagnum hava eina felags støðu og eina felags fatan, og tað eru mong dømi um, at okkara sjónarmið, sum frá líður, vinna frama bæði í almenninginum og í landspolitisku skipanini.

Kommunurnar skulu gerast ein alsamt størri og meira avgerandi partur av fólkastýrinum og teimum tænastuveitingum, sum tað almenna bjóðar borgarunum. Okkara fyrimunur sum kommunur er sjálvsagdur. Nærleikin millum politikara og borgara í kommunum tryggjar betri tænastu, betri umsiting og betri møguleikar fyri virknari borgaraluttøku - og harvið samfelagsligan framburð. Tí eiga vit framhaldandi at virka fyri at fáa fleiri málsøki løgd til kommunala geiran.

Tað skal verða mín vón, at vit eisini komandi fýra árini fara at virka sum ein sterk eind, menna felagsskapin enn meira og fremja felags politisk áhugamál kommunala geiranum at frama.

Við hesum orðum skal eg takka fyri meg og geva orðið aftur til aðalfundin.



*Vestmannabjørgini*
*Mynd: Ólavur Frederiksen, faroephoto*

# 7. Um Kommunufelagið

**Stýrið 2021**
**Stýri felagsins er mannað við borgarstjórum samsvarandi § 7 í viðtøkunum:**
Heðin Mortensen, formaður, Tórshavnar kommuna
Tórbjørn Jacobsen, næstformaður, Runavíkar kommuna
Bjarni Johansen, Vágs kommuna
Bjarni Prior, Vága kommuna
Dávur Juul, Fuglafjarðar kommuna
Heri Sverrason, Sands kommuna
Jóanis Lisberg, Fámjins kommuna
Jógvan Kruse, Sunda kommuna
Karl H. Johansen, Klaksvíkar kommuna
Kristin Michelsen, Tvøroyar kommuna
Per Martin Gregersen, Eysturkommuna
Pauli T. Petersen, Vestmanna kommuna
Súni í Hjøllum, Nes kommuna

**Nevndin í KAF**
Pauli T. Petersen, formaður, Vestmanna kommuna
Per Martin Gregersen, næstformaður, Eysturkommuna
Dávur Juul, Fuglafjarðar kommuna
Jógvan Kruse, Sunda kommuna
Bogi Bendtsen, SEV
Jóhannus Danielsen , IRF

**Starvsfólkabólkurin 2021**
**Í starvsbólkinum eru umsitingarleiðararnir sambært § 8 í viðtøkunum:**
Bjørgfríð Ludvig, forkvinna, Tórshavnar kommuna
Arni Teindal, Fámjins kommuna
Dinna Jensen, Runavíkar kommuna
Erik Lervig, Eysturkommuna
Fróði Mortensen, Tvøroyrar kommuna
Henrik Weihe Joensen, Fuglafjarðar kommuna
Jóannes Prestá, Sunda kommuna
Jóhan Henrik Ellefsen, Vága kommuna
Marner Højsted, Sands kommuna
Maud Poulsen, Vestmanna kommuna
Petry Joensen, Vágs kommuna
Sigurd Justinussen, Nes kommuna
Tummas Eliasen, Klaksvíkar kommuna

**Skrivstovan**
Kommunufelagið
R. C. Effersøesgøta 26
100 Tórshavn
Telefon 30 24 80
www.kf.fo
kf@kf.fo

**Starvsfólk KF Teldupostur: Telefon:**
Eyðun Christiansen, stjóri eydunc@kf.fo 28 24 80
Jóhan Lamhauge, løgfrøðiligur ráðgevi johanlam@kf.fo 52 19 75
Hans Kári Vang, búskaparfrøðingur hanskariv@kf.fo 78 70 05
Armgarð Hammer, skrivari armgard@kf.fo 28 24 81
Sigrid J. Dalsgaard, verkætlanarleiðari sigridjd@kf.fo 27 01 15
Martin Johannessen, skrivstovufólk martin@kf.fo

**Starvsfólk KAF Teldupostur: Telefon:**
Anita Fugløø, leiðari anita@kaf.fo 22 63 39
Jónleyg J. Bech, fulltrúi jonleyg@kaf.fo 28 03 39
Bina Reginsdóttir, fulltrúi binar@kaf.fo 22 98 66

**Starvsfólk BVS Teldupostur: Telefon:**
Oddbjørg Balle, leiðari ob@bvs.fo 22 56 96
Anna Dam, løgfrøðiligur ráðgevi annadam@bvs.fo 51 90 82
Jendis Gærdbo, sosialráðgevi jg@bvs.fo 22 30 23

**Starvsfólk SSP ráðgevingin Teldupostur: Telefon**
Óli Rubeksen, SSP ráðgevi or@ssp.fo 22 24 98

**Starvsfólk Listaleypurin Teldupostur: Telefon**
Rannvá K. Justinussen, verkætlanarfólk, listaleypurin@listaleypurin.fo 27 77 47

# Viðtøkur fyri Kommunufelagið

## NAVN, LIMASKAPUR OG HEIMSTAÐUR

**§ 1.** Navn felagsins er Kommunufelagið, og hevur felagið heimstað í Tórshavn

**§ 2.** Allar kommunur í Føroyum kunnu gerast limir.

**§ 3.** Upptøka av nýggjum limum verður góðkend á aðalfundi.

## ENDAMÁL

**§ 4.** Endamál felagsins er at virka fyri felags áhugamálum, størri kommunalum sjálvræði, og betri samstarvi millum kommunurnar.

## AÐALFUNDURIN

**§ 5.** Aðalfundurin er hægsta vald felagsins.
*Stk. 2.* Borgarstjórin umboðar kommunustýrið til at taka avgerð á aðalfundinum. Aðrir kommunustýrislimir hava rætt at møta.
*Stk. 3.* Boðast skal til aðalfund við í minsta lagi 30 daga freist. Fundarskrá verður kunngjørd limakommununum í seinasta lagi 14 dagar innan aðalfundin.
*Stk. 4.* Limir, ið vilja hava mál til viðgerðar á aðalfundinum, senda felagnum hesi í minsta lagi 21 dagar innan aðalfundin.
*Stk. 5.* Á aðalfundi hevur hvør kommuna eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva 1. januar undan aðalfundinum, tó so, at eingin kommuna hevur fleiri enn 45 % av samlaðu atkvøðunum.
*Stk. 6.* Er ikki annað tilskilað í hesum viðtøkum, verða avgerðir á aðalfundi tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.
*Stk. 7.* Aðalfundurin er viðtøkuførur, tá ið minst helvtin av limunum eru møttir.

**§ 6.** Ársaðalfundur verður hildin á hvørjum árið í seinasta lagi 30. apríl við hesi skrá:

a) Val av fundarstjóra.
b) Formaðurin letur frágreiðing um virksemi felagsins í farna árinum og um framtíðarætlanir felagsins.
c) Framløga av roknskapi til góðkenningar.
d) Val av grannskoðara.
e) Innkomin uppskot.
f) Ymiskt.

*Stk. 2.* Eykaaðalfundur verður hildin, tá ið stýrið heldur tað vera neyðugt, ella tá ið minst helmingurin av limakommununum skrivliga biðja um tað. Innkalling til eykaaðalfund fer fram á sama hátt og við somu freist, sum til vanligan aðalfund

## STÝRIÐ

**§ 7.** Tá talan ikki er um mál, sum skulu viðgerast á aðalfundi, er ovasta leiðsla felagsins eitt stýri við 13 limum, sum er sett saman fyri 4 ár í senn. Stýrislimur skal vera borgarstjóri.
*Stk. 2.* Stýrið tekur við 1. januar eftir kommunustýrisval, og verður stýrið valt eftir hesi skipan:

- Norðuroyggjar (Klaksvík, Hvannasund, Viðareiði, Húsa k., Kunoy og Fugloy) 1 lim.
- Eystur Eysturoy (Fuglafjørður, Eystur k.) 2 limir.
- Vestur Eysturoy (Nes, Runavík, Sjóvar k.) 1 lim.
- Sundalagið (Sunda k. og Eiði) 1 lim.
- Streymoy (Tórshavn) 1 lim.
- Vesturstreymoy (Vestmanna og Kvívík) 1 lim.
- Vágar (Sørvágur, Vága k.) 1 lim.
- Sandoy (Sandur, Skopun, Skálavík, Húsavíkar k. og Skúvoy) 1 lim.
- Norður Suðuroy (Hvalba, Tvøroyri og Fámjin) 1 lim.
- Suður Suðuroy (Hov, Porkeri, Vágur og Sumba) 1lim.

Kommunustýrini í hvørjum einstøkum øki gera semju um at velja ein stýrislim. Semjast kommunurnar ikki um umboðanina, verður borgarstjórin í størstu kommununi umboð fyri økið.
*Stk. 3.* Kommunurnar sum sambært stk. 2 ikki fáa lim í stýrið, velja 2 umboð eftir hesum leisti.

- Kommunurnar við fleiri enn 750 íbúgvum velja sínámillum eitt umboð
- Kommunurnar við færri enn 750 íbúgvum velja sínámillum eitt umboð

*Stk. 4.* Tá ið valt verður sambært stk. 3, hevur hvør kommuna eina atkvøðu. Atkvøðugreiðslan fer fram eftir meirilutavalháttinum sambært § 2 í kommunustýrislógini.
*Stk. 5.* Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni eftir somu mannagongd, sum formaður og næstformaður verða valdir í kommunustýrum, tó so, at formaður og næstformaður verða valdir fyri 2 ár í senn.
*Stk. 6.* Stýrisfundur er viðtøkuførur, tá ið minsta lagi helmingurin av stýrislimunum eru møttir. Hvør stýrislimir hevur eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva 1. januar í teimum kommununum, sum stýrislimurin umboðar. Tó so, eingin stýrislimir kann hava fleiri enn 45 % av samlaðu atkvøðunum.
*Stk.7.* Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Miðast skal tó ímóti, at stýrisavgerðir eru einmæltar.
*Stk. 8.* Stýrisfundur skal vera í minsta lagi eina ferð hvønn ársfjórðing. Formaðurin kann kalla stýrið til fundar, tá mál er, sum krevur stýrisavgerð, og sum ikki kann bíða til næsta regluliga fund. Stýrið kann eisini verða kallað saman, tá ið minst helmingurin av stýrislimunum skrivliga biðja um tað.
*Stk. 9.* Fráboðan um stýrisfund verður send stýrislimum 14 dagar áðrenn fund.

## STARVSBÓLKURIN

**§ 8.** Í starvsbólkinum sita kommunuskrivararnir/-stjórarnir í teimum kommunum, sum hava umboð í stýrinum. Stýrið velur starvsbólkaformann fyri tvey ár í senn.
*Stk. 2.* Starvsbólkurin skal fyrireika mál, sum skulu viðgerast á stýris- og aðalfundi, og hann skal arbeiða við øllum málum, sum stýrið beinir til hansara.
*Stk. 3* Starvsbólkurin hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin.
*Stk. 4.* Tó skal formaðurin kalla til fundar, hvørja ferð stýrisfundur er lýstur, um so er, at mál, sum skulu viðgerast har, ikki eru liðug fyrireikað.
*Stk. 5* Allir starvsbólkalimir skulu møta á stýrisfundum.
*Stk. 6.* Stýrisformaðurin skal hava fundarboð til hvønn starvsbólkafund.

## SKRIVSTOVAN

**§ 9.** Stýrið setur og loysir úr starvi stjóra, ið hevur ábyrgdina mótvegis stýrinum, fyri at virksemi felagsins verður rikið sambært galdandi reglum.
*Stk. 2.* Stjórin hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi, og skal í samstarvi við starvsbólkin og stýrið umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.
*Stk. 3.* Stýrið ger starvsskipan fyri stjóran.
*Stk. 4.* Stjórin setur og loysir úr starvi onnur starvsfólk eftir ásetingum í starvsskipanini sambært stk. 3.
*Stk. 5.* Starvsbólkurin er dagliga bindiliðið millum stjóran og limakommunurnar.

## FÍGGJARVIÐURSKIFTI

**§ 10.** Útreiðslurnar av at reka felagið verða goldnar av limakommununum. Limagjaldið verður ásett samsvarandi íbúgvaratalinum í kommununum 1. januar í tí ári, sum fíggjarætlanin verður samtykt. Tó kann eingin kommuna rinda meira enn 45 % av limagjaldinum.
*Stk. 2.* Stýrisformaðurin ger saman við starvsbólkaformanninum og stjóranum uppskot til fíggjarætlan fyri felagið komandi fíggjarár, sum hann fyrileggur stýrinum til góðkenningar í seinasta lagi í apríl ársfjórðingi.
*Stk. 3.* Áðrenn fíggjarætlan felagsins verður viðgjørd í stýrinum, skal starvsbólkurin hava gjørt sítt tilmæli.
*Stk. 4.* Limakommunurnar rinda í minsta lagi 1/12 part av limagjaldinum hvønn mánað til felagið.
*Stk. 5.* Eingin limakommuna heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hennara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.
*Stk. 6.* Ongar avgerðir í málum, sum krevja kommunustýrissamtykt, eru bindandi fyri limakommunurnar, uttan tílík samtykt fyriliggur.

## ROKNSKAPUR

**§ 11.** Stjórin hevur ábyrgd av roknskaparførsluni.
*Stk. 2.* Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum ella skrásettum grannskoðara.

## AÐRAR ÁSETINGAR

**§ 12.** Felagið verður teknað av stýrisformanninum og starvsbólkaformanninum ella stjóranum í felag, ella av tveimum stýrislimum saman við starvsbólkaformanninum ella stjóranum.

**§ 13.** Samtyktir um broytingar av viðtøkunum ella avtøku av felagnum skulu gerast av aðalfundinum. Í minsta lagið ¾ av atkvøðutalinum skulu vera umboðað, og uppskotið skal samtykkjast við 3/5 av greiddum atkvøðum.
*Stk. 2.* Er fundurin ikki viðtøkuførur, verður nýggjur fundur 14 dagar seinni, og er hesin viðtøkuførur uttan mun til, hvussu nógvar atkvøður eru umboðaðar. Samtykt skal tó vera við 3/5 av greiddum atkvøðum.

**§ 14.** Við minst 6 mánaða ávaring kann ein kommuna siga upp limaskap sín í felagnum til ein 1. januar.
*Stk. 2.* Kommunur, ið melda seg úr felagnum, hava einki krav móti felagnum ella ognum felagsins, og hefta ikki fyri skyldur felagsins.

*§ 15.* Verður felagið tikið av, falla ognirnar aftur til limakommunurnar í sama lutfalli, sum tær hava luttikið í útreiðslum felagsins seinasta roknskaparárið.

## SKIFTISÁSETINGAR

**§ 16.** Felagið tekur yvir øll rættindi og allar skyldur hjá KSF og FKF.

**§ 17.** Í samband við fyrsta valskeiðið, sum verður trý ár, tekur stýrið sjálvt avgerð um val av formanni og næstformanni sambært § 7, stk. 5, og viðvíkjandi val av starvsbólkaformanni sambært § 8, stk. 1.

**§ 18.** Limagjald fyri fyrsta roknskaparárið verður samtykt á stovnandi aðalfundi.

**Gildiskoma**
**§ 19**. Viðtøkur felagsins fáa gildi frá 1. januar 2014.

Samtykt á stovnandi aðalfundi 13. desember 2013

# Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

## § 1 NAVN OG LIMASKAPUR

*Stk. 1.* Navn felagsins er Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, stytt KAF.
*Stk. 2.* KAF er sjálvstøðugt limafelag undir Kommunufelagnum, stytt KF
*Stk. 3.* Limir í felagnum eru umframt KF, Elfelagið SEV, stytt SEV og L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, stytt IRF
*Stk. 4.* Heimstaður felagsins er Tórshavn

## § 2 ENDAMÁL FELAGSINS

*Stk. 1.* Endamál felagsins er at fremja áhugamál limanna í øllum málum um lønar- og setanarviðurskifti starvsfólkanna. Hetta verður gjørt við at:

- samskipa lønarlagið og samráðast um sáttmála við starvsfólka- og fakfeløg, sum hava samráðingarrætt
- røkja áhugamál limanna í málum um lønar- og setanarviðurskifti, starvsmetingum, útbúgving o.a., og røkja samskifti við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum samráðst verður við og myndugleikar annars, við neyðugum atliti til kommustýrislógina § 5, stk. 5.
- virka fyri og ansa eftir, at galdandi sáttmálar verða hildnir
- gera sítt til, at tað slepst undan trætumálum millum arbeiðsgevara og starvsfólk, ella um hetta ikki ber til, at royna at fáa tey loyst á friðarligan hátt, uttan arbeiðssteðg. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál, røkir felagið, tá heitt verður á tað, mál arbeiðsgevaranna so langt, sum hóskandi verður hildið
- virka fyri, at trætumál limanna millum verða loyst
- við skeiðvirksemi ella á annan hátt upplýsa limir felagsins um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalum/interkommunala arbeiðsgevara áhugamálum

## § 3 UPPTØKA

*Stk. 1.* KF og interkommunalir felagsskapir í Føroyum kunnu gerast limir við skrivliga at senda umsókn til nevnd felagsins.
*Stk. 2.* Limir í felagnum skriva undir viðtøkur felagsins, soleiðis sum tær eru, ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar

## § 4 ÚTMELDAN

*Stk. 1.* Eingin kann siga seg úr felagnum, uttan við innskrivaðum brævi og við 6 mánaða freist.
*Stk. 2.* Hóast limur sigur seg úr felagnum, er hann framvegis bundin av galdandi sáttmálum, til hesir halda uppat.
*Stk. 3.* Limur, sum fer úr felagnum, hevur einki krav móti felagnum.

## § 5 ÁRSFUNDUR

*Stk. 1.* Ársfundur verður hildin á hvørjum ári innan 1. mai.
*Stk. 2.* Nevndin í KAF hevur rætt til at luttaka á aðalfundinum hjá KF, men ikki skyldu at luttaka.
*Stk. 3.* Innkalling til ársfund verður gjørd í minsta lagi 14 dagar frammanundan.
*Stk. 4.* Saman við innkallingini verður sendur grannskoðaður roknskapur og onnur innkomin mál.
*Stk. 5.* Atkvøðurættur: KF hevur 4 atkvøður, SEV og IRF hava 1 atkvøðu hvør.
Ársfundurin er viðtøkufførur, tá meira enn helmingurin av atkvøðutalinum eru umboðað. Allar avgerðir á ársfundinum verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.
*Stk. 6.* Mál, sum skulu viðgerast á ársfundinum, skulu vera KAF í hendi seinast 4 vikur undan ársfundinum. Uppskot frá øðrum enn nevndini skulu vera felagnum í hendi í so góðari tíð, at tey kunnu takast við í fundarfráboðanina, um tey skulu koma til viðgerðar á aðalfundi.
*Stk. 7.* Ársfundurin verður skipaður við hesi skrá:

a) Formaðurin skipar fyri vali av fundarstjóra
b) Formansfrágreiðing um virki felagsins í farna ári.
c) Framløga av grannskoðaðum roknskapi
d) Innkomin mál.
e) Ymiskt

## § 6 NEVNDIN

*Stk. 1.* Í nevndini sita 6 limir, sum verða valdir av nýggjum eftir hvørt kommunustýrisval og virka til nýggj nevnd er vald. KF velur 4 limir, meðan SEV og IRF velja hvør sín lim. Á sama hátt verða 6 varalimir tilnevndir.
*Stk. 2.* Nýggj nevnd tekur við so skjótt, sum allir limirnir eru tilnevndir, og í seinasta lagi 1. mai.
*Stk. 3.* Nevndin ger sína egnu starvsskipan.
*Stk. 4.* Nevndin velur sjálv formann og næstformann.
*Stk. 5.* Nevndarfundur er so ofta, sum formaðurin metir tað vera neyðugt, ella um ein nevndarlimur setir ynski fram um tað.
*Stk. 6.* Nevndin er viðtøkufør, tá meira enn helmingurin av nevndarlimunum eru á fundi.
*Stk. 7.* Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.
*Stk. 8.* Um tað, sum fer fram á nevndarfundi, verður gjørd fundarfrágreiðing, sum allir nevndarlimir góðkenna.

## § 7 SKRIVSTOVAN

*Stk. 1.* Fyrisitingin í KAF er partur av fyrisitingini í KF.
*Stk. 2.* Ovasta fyrisitingarliga leiðsla felagsins er stjórin í KF. Stjórin setur og loysir úr starvi starvsfólk í KAF í samráð við nevnd felagsins.
*Stk. 3.* Í øllum málum sambært § 2 virkar fyrisitingin í KAF undir leiðslu av nevnd felagsins.
*Stk. 4.* Skrivstovuleiðarin í KAF hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi og skal í samstarvi við stjóran í KF og nevnd felagsins umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.

## § 8 LIMAGJALD

*Stk. 1.* Tá nýggir limir verða upptiknir, skal samráðast um limagjaldið.
*Stk. 2.* Formaðurin ger saman við stjóranum í KF og skrivstovuleiðaranum í KAF uppskot til fíggjarætlan fyri komandi ár, harundir ásetan av limagjaldi. Formaðurin leggur uppskotið fyri nevndina til góðkenningar í seinasta lagi tann 1. juli.
*Stk. 3.* KF rindar 2/3 av ásetta limagjaldinum. SEV og IRF rinda 1/3 av ásetta limagjaldinum, og av hesum rindar SEV 2/3 og IRF 1/3.

*Stk. 4.* Eingin limur heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hansara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.

## § 9 TEKNING

*Stk. 1.* Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi ella saman við skrivstovuleiðaranum fyri KAF.

## § 10 SAMRÁÐINGARNEVND

*Stk. 1.* Nevndin tilnevnir umboð og formann í samráðingarnevnd. Við sáttmálasamráðingar, sum viðvíkja SEV og IRF, kann umboð frá nevndu felagsskapum luttaka sum partur av samráðingarnevndini. Annars kann samráðingarnevndin, eftir meting nevndarinnar, víðkast við umboðum fyri teir einstøku limirnar.
Samráðingarnevndin kann, um nevndin ynskir tað, leita sær sakkunnleika aðrastaðni.
*Stk. 2.* Uppgávan hjá samráðingarnevndini er at samráðast við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum hava rætt til at samráðast um øll sáttmálaviðurskifti.
*Stk. 3.* Samráðingarnevndin ger sína egnu starvsskipan.

## § 11 ROKNSKAPUR OG GRANNSKOÐAN

*Stk. 1.* Roknskapurin hjá KAF er ein sjálvstøðugur roknskapur, sum er partur av roknskapinum hjá Kommunufelagnum og verður grannskoðaður, sum ein partur av hesum.
*Stk. 2.* Inntøkur og útreiðslur fyri KAF verða neyvt atskildar frá fíggjarviðurskiftunum hjá KF annars.

## § 12 TAGNAR- OG UPPLÝSINGARSKYLDA

*Stk. 1.* Limir felagsins hava tagnarskyldu viðvíkjandi upplýsingum um innanhýsis viðurskifti í felagnum.
*Stk. 2.* Limirnir hava skyldu til, eftir áheitan frá nevndini, at lata teir upplýsingar, ið hava týdning fyri at kunna samráðast, umframt upplýsingar um lønar-, arbeiðs- og útbúgvingarviðurskifti fyri starvsfólkið. Hesir upplýsingar verða viðgjørdir í trúnaði.

## § 13 TRÆTUMÁL

*Stk. 1.* Verður arbeiðssteðgur ella trætumál millum lim í felagnum og starvsfólk tess ella fakfelagið, binda hinir limirnir í felagnum seg at stuðla og hjálpa viðkomandi limi mest møguligt við m.a. at taka lut í móttiltøkum, sum nevndin í felagnum samtykkir at seta í verk.
*Stk. 2.* Allir limir binda seg til, um nevndin boðar frá tí, ikki at seta fólk hjá teimum limum í starv, har arbeiðssteðgur er, fyrr enn hann er hildin uppat.

## § 14 GERÐARRÆTTUR

*Stk. 1.* Trætumál millum felagið og lim kann leggjast fyri gerðarrætt.
*Stk. 2.* Í gerðarrættinum eru tveir limir, har felagið velur annan og limurin hin, umframt ástøðumann, sum verður tilnevndur av Føroya rætti.
*Stk. 3.* Avgerðin hjá gerðarrættinum er endalig og kann ikki leggjast fyri vanligu dómstólarnar.

## § 15 AVTØKA AV FELAGNUM

*Stk. 1.* Felagið verður tikið av, tá ið minst ¾ av limunum ynskja tað.
*Stk. 2.* Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins býttar millum limir felagsins á tann hátt, at miðaltalið fyri limagjaldið trý tey seinastu árini gevur lutfalstalið til hvønn lim.

## § 16 GILDISKOMA

*Stk. 1.* Hesar viðtøkur fáa gildi, tá ið tær eru samtyktar á aðalfundi í KAF.

Tórshavn hin 12. mars 2014

# Viðtøkur fyri Barnaverndarstovu Føroya

## VIÐTØKUR FYRI BARNAVERNDARSTOVU FØROYA

**§ 1.** Barnaverndarstova Føroya er felagskommunalur stovnur, sum kommunurnar eiga.

## ENDAMÁL STOVNSINS

**§ 2.** Barnaverndarstovan skal arbeiða fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkini úti um landið og seta á stovn og reka fosturforeldraskipan sambært ásetingunum í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd við seinni broytingum.

## POLITISK LEIÐSLA

**§ 3.** Ovasta politiska leiðsla stovnsins er stýrið í Kommunufelagnum.

## FYRISITING

**§ 4.** Stjórin fyri KF setir leiðara at hava dagligu fyrisitingarligu og fakligu leiðsluna av Barnaverndarstovuni.
*Stk. 2.* Stjórin fyri KF letur gera starvsskipan fyri leiðaran.
*Stk. 3.* Stjórin í KF setur og loysir úr starvi øll starvsfólk á Barnaverndarstovuni
*Stk. 4.* Leiðarin fyri Barnaverndarstovuna vísir fyrisitingarliga til stjóran fyri Kommunufelagið.

## FÍGGING

**§ 5.** Kommunufelagið rindar allar útreiðslur fyri Barnaverndarstovuna
*Stk. 2.* leiðarin ger saman við stjóranum innan 1 juli eina fíggjarætlan sum verður partur av samlaðu fíggjarætlanin hjá KF.

## GRANNSKOÐAN

**§ 6.** Roknskapurin verður grannskoðaður, sum ein partur í roknskapinum hjá KF.

## GILDISKOMA

**§ 7.** Hesar viðtøkur koma í gildi 1. januar 2014.

## SKIFTISÁSETING

**§ 8.** Verandi nevnd fyri Barnaverndarstovuna – formenninir í KSF og FKF, áðrenn Kommunufelagið varð stovnað – halda áfram hetta valskeiðið til 1. januar 2017, men leggja øll mál av týdningi fyri stýrið í KF.

Tórshavn 17.01.2014

# 8. Kommuna og kommunuhugtakið

Tann kommunala skipanin, ið vit í dag hava í Føroyum, er í stóran mun ávirkað av danskari og norðurlendskari fyrisitingar- og lóggávusiðvenju. Men hugtakið lokalt sjálvræði er elligamalt og byggir á hugsunarhátt úr rómverskum rætti, og snúði seg í høvuðsheitum um, at borgarar í einum býi ella øki høvdu framíhjárættindi sum borgarar í rómverska ríkinum, men vórðu stýrd av egnum lokalum myndugleikum eftir sínum egnu lógum.

Longu seint í miðøldini høvdu kommunur nógvar ymsar uppgávur at røkja og hetta broyttist nakað undir einaveldinum, men við donsku grundlógini frá 1849 bleiv sjálvstøðugi rætturin hjá kommununum til at røkja egnar uppgávur staðfestur. Tó var staturin eftirlitsmyndugleiki.

Fyrsta føroyska kommunulógin kom í 1872, og nú galdandi kommunustýrislógin er frá ár 2000.

Í Føroyum hava vit nú 29 sjálvstøðugar kommunur, sum í fólkatali eru spjaddar frá Fugloyar og Skúvoyar kommunum við færri enn 50 íbúgvum til Tórshavnar kommunu við fleiri enn 22.000 íbúgvum. Hóast hesa spjaðing í støðd, er formliga grundarlagið undir føroysku kommununum stórt sæð eins.

## KOMMUNUR Í STÝRISSKIPANARLIGUM HØPI

Lokalt sjálvræði er ein týðandi hornasteinur í okkara fólkaræði. Í § 82 í donsku grundlógini er ásett, at *»Kommunernes ret til under statens tilsyn selvstændigt at styre deres anliggender ordnes ved lov.«*

Sambært hesum er greitt, at kommunurnar hava rætt til sjálvstøðugt at stýra egnum viðurskiftum. Kommunurnar hava sjálvstøðugt fíggjarligt frælsi og politiskt sjálvræði. Kommunurnar eru sostatt sjálvstøðugar politiskar og fyrisitingarligar eindir. Harumframt er breið semja um, at málsførleikin hjá kommununum ikki kann avmarkast á ein tílíkan hátt, at tað ikki longur er talan um veruligt sjálvræði. Umframt rættin til sjálv at útskriva og krevja upp skatt, er kommunalt sjálvræði tengt at teimum uppgávum, ið kommunurnar skulu loysa og tí politiska rásarúmi, sum kommunurnar hava til at leggja til rættis, hvussu kommunalar uppgávur skulu loysast.

§ 82 í grundlógini merkir eisini, at viðurskiftini millum landsmyndugleikarnar og kommunurnar ikki eru yvir- og undirskipað, eins og landsfyrisitingin ikki hevur heimildir at geva kommununum boð, á sama hátt sum annars er galdandi í viðurskiftunum millum landsfyrisitingina og stovnar undir landinum. Bindandi reglur fyri kommunur skulu vera ásettar við heimild í lóg ella aðrari rættarkeldu.

Umframt í grundlógini, er lokalt sjálvræði við tilverurættinum hjá kommununum staðfestur í § 56 í stýrisskipanarlógini, ið er soljóðandi: *»Rættur kommunanna at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins verður ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millumkommunufelagsskapir kunnu skuldbindast við láni, borgan o.ø.m.«*

Sambært fyrireikandi arbeiðinum, orðaljóðinum og viðmerkingunum til § 56, er ásetingin í stýrisskipanarlógini ein beinleiðis endurtøka av tí rætti, sum kommunurnar longu frammanundan hava eftir § 82 í grundlógini.

Umframt staðfestingina í grundlógini og stýrisskipanarlógini um rættin hjá kommunum at skipa egin viðurskifti, er lokala sjálvræðið eisini ein týðandi táttur í evropeisku demokratisku siðvenjuni. Sambært evropeiska sáttmálanum um lokalt sjálvræði frá 1985, verður lokalt sjálvstýri hugsað sum rætturin og førleikin hjá einum lokalum myndugleika, innan lógarinnar karmar, at stýra og fyrisita einum munandi parti av almennum viðurskiftum, við egnari ábyrgd og við støði í áhuganum hjá fólkinum á staðnum.

Almennar uppgávur skulu í høvuðsheitum røkjast av myndugleikum, sum eru borgaranum næstir. Um annar myndugleiki skal røkja uppgávuna, so eigur hetta at vera grundað á, hvat slag og av hvørjum vavi uppgávan er, og við atliti at virkisføri og fíggjarligum viðurskiftum. Tær heimildir, ið eru lagdar til lokalar myndugleikar, eiga vanliga at vera givnar til fulnar og vera óskerdar. Heimildirnar eiga heldur ikki at verða gjørdar verri ella avmarkast av øðrum almennum myndugleika, uttan so at hetta er heimilað í lóggávuni.

Europæiski sáttmálin um lokal sjálvræði ásetur nakrar meginreglur, og eru hesar í høvuðsheitum,

- at almennar uppgávur skulu røkjast av einum myndugleika so tætt at borgaranum sum gjørligt,
- at teir lokalu myndugleikarnir skulu hava veruligt sjálvræði yvir teimum uppgávum, ið landafrøðiliga liggja lokalt, og
- at lokalu myndugleikarnir skulu kunna útvega sær fígging til at loysa uppgávuna, her í millum eisini rætt til at útskriva lokalan skatt.

## KOMMUNUNALRÆTTURIN

Kommunalrættur verður vanliga býttur í 3 ymsar tættir, sum er: lóggáva, ið regulerar kommunal viðurskifti, *kommunufulltrúin* og *kommunala eftirlitið.*

Lóggáva um kommunal viðurskifti snýr seg í høvuðsheitum um at skipa lóggávu viðvíkjandi økjum, har kommunur hava skyldur og heimildir mótvegis borgarum sínum. Kommunufulltrúin er eitt heimildargrundarlag sum ikki er regulerað í lóg, men sum kommunurnar kunnu nýta sum heimild at virka á, um ávísar treytir eru loknar. Umframt ta lóggávu, sum beinleiðis regulerar kommunal viðurskifti, eru kommunurnar eisini almennir myndugleikar, og eru tær tí eisini fevndar av fyrisitingarligari lóggávu sum t.d. fyrisitingarlóg, lóg um innlit í fyrisitingina o.t.

Viðurskiftini hjá føroysku kommununum verða stýrd yvirskipað eftir kommunustýrislógini frá 2000. Sambært hesi lóg er kommunustýrið evsti politiski og fyrisitingarligi myndugleiki í kommununi og hevur evsta vald og evstu ábyrgd av kommunalum viðurskiftum.

Landsstýrið hevur eftirlit við kommununum. Kommunala eftirlitið er eitt sokallað *legalitetseftirlit*, sum merkir, at landsstýrið hevur eftirlit við, at kommunurnar halda galdandi lóggávu. Hinvegin skal eftirlitið ikki taka

støðu til, hvørt kommunurnar bera seg skynsamt at, tí hetta hoyrir undir politiska frælsið hjá kommununum at gera av. Kommunala eftirlitið hevur eisini heimild at gera av ivamál um, hvar mørkini fyri heimildum eftir kommunufulltrúini eru.

### SAMANUMTIKIÐ ERU EYÐKENNINI FYRI LOKALA SJÁLVRÆÐIÐ,

- at kommununnar tilverurættur er tryggjaður í grundlóg og stýrisskipanarlóg og byggir á evropeiska demokratiska siðvenju,
- at kommunurnar eru sjálvstøðugar politiskar og fyrisitingarligar eindir við fíggjarligum og politiskum frælsi,
- at kommunurnar hava frælsi at gera egnar raðfestingar í mun til tær uppgávur, tær skulu røkja,
- at kommunur ikki eru undirskipaðir stovnar undir landinum og tískil kann landið ikki geva kommununum bindandi boð,
- at kommunur hava rætt til at útskriva egnar skattir og at nýta hesar inntøkur eftir egnum politiskum raðfestingum.

# 9. Búskaparlig høvuðstøl fyri 2020

Árið 2020 er ikki endaliga uppgjørt enn, men mett verður, at rakstrarútreiðslurnar hjá kommununum vóru samanlagt 2.124 mió. kr. í 2020. Inntøkurnar vóru 2.794 mió. kr. Hetta ber í sær, at rakstrarúrslitið fyri allar kommunur samanlagt verður umleið 670 mió. kr.

Íløgurnar verða mettar til 894 mió. kr. í 2020, og tað hevur við sær, at RLÚ-úrslitið fyri allar kommunur samanlagt verður eitt hall á umleið 224 mió. kr. í 2020.

Hetta er triðja árið á rað, at hall er í samlaða kommunala geiranum. Í 2019 var hallið 176 mió. kr., og í 2018 var tað 113 mió. kr. Men árini frammanundan hevur fyri tað mesta verið talan um avlop.
*Sí talvu 3.*

Tað eru tær søguliga stóru íløgurnar, ið eru orsøk til, at hall hevur verið seinastu trý árini. Verður einans hugt at sjálvum rakstrinum, er talan um eitt munagott rakstraravlop, sum er væl størri enn árligu íløgurnar vanliga eru.

Raksturin í 2020 vaks við samanlagt 115 mió. kr. Tað er ein vøkstur á 5,7%. Inntøkurnar vuksu samanlagt 87 mió. kr., sum er ein vøkstur á 3,2%. Íløgurnar vóru 23 mió. kr. størri í 2020 enn í 2019, tað er ein vøkstur á 2,6%.
*Sí talvu 4.*

**Talva 3**

Úrslit samanlagt fyri allar kommunur

| | R2018 | R2019 | M2020 |
|---|---|---|---|
| Rakstur | 1.923 | 2.009 | 2.124 |
| Inntøkur | 2.523 | 2.705 | 2.794 |
| **Rakstrarúrslit** | **600** | **696** | **670** |
| Iløgur | 713 | 872 | 894 |
| **RLÚ-úrslit** | **-113** | **-176** | **-224** |

**Talva 4**

Rakstrar-, inntøku- og íløguvøkstur

| | Vøkstur 2019 í mió. kr. | Vøkstur 2019 í % | Vøkstur 2020 í mió. kr. | Vøkstur 2020 í % |
|---|---|---|---|---|
| Rakstur | 86 | 4,5% | 115 | 5,7% |
| Inntøkur | 182 | 7,2% | 87 | 3,2% |
| Íløgur | 159 | 22,3% | 23 | 2,6% |

# 10. Inntøkur

Samlaðu inntøkurnar hjá kommununum vóru næstan 2,8 mia. kr. í 2020.

Størsti parturin av inntøkunum hjá kommununum stava frá kommunuskatti. Í 2020 var talan um 2.107 mió. kr., og tað er umleið 3/4 av samlaðu inntøkunum.

Inntøkurnar frá skatti av inngjøldum til eftirløn hava, síðan eldraøkið var lagt út í 2015, verið ein munandi og vaksandi partur av kommunalu inntøkunum. Í fjør gjørdist talan um 409 mió. kr. Restin av inntøkunum stavaði frá felagsskattinum, sum var 170 mió. kr., og afturbering fyri serskipanir, sum var 108 mió. kr.

*Sí talvu 5.*

Inntøkurnar vuksu við samanlagt 109 mió. kr. í 2020, tað er 3,2%. Hetta má sigast at vera ein góður vøkstur, havandi í huga støðuna við koronu.

Til samanberingar var vøksturin í 2019 tó væl størri, heilar 183 mió. kr. ella 7,2%. So tað sær út til, at koronustøðan hevur tikið toppin av vøkstrinum uttan tó at hava minkað um inntøkurnar. Í hesum sambandi má tað sigast at vera heppið, at vøksturin í búskapinum var søguliga stórur, tá ið korona rakti, tí annars hevði uttan iva verið talan um lækking í inntøkum.

Vøksturin í eftirlønarskattinum var óvanliga lágur í 2020, einans 11 mió. kr., ella 2,8%. Í 2019 var vøksturin góð 13%. Orsøkin til lága vøksturin í eftirlønarskatti í 2020 er, at tann stigvísa skattingin av eftirløn, sum kom í gildi í 2019, nú fekk virknað. Hetta hevði við sær eina regulering fyri árið 2019 á 21,5 mió. kr., sum kommunurnar skulu endurrinda eftirlønaruppsparárum. Upphæddin var fyri árið 2019, men varð bókað í 2020. Um henda regulering ikki var, hevði eftirlønarskatturin verið 21,5 mió. kr. hægri í 2020, og vøksturin hevði verið 8,2% í staðin fyri 2,8%.

*Sí talvu 6*

## Kommunuskattur

Kommunuskattur verður rindaður av skattskyldugu inntøkuni omanfyri botnfrádráttin á 30 tús. kr. Botnfrádrátturin, ið verður ásettur av Løgtinginum, hevur verið óbroyttur síðan 2008. Frá útroknaða skattinum verður drigin ein barnafrádráttur frá, ið kommunustýrið sjálvt ásetur.

Kommunuskattaprosentini hava sum heild verið lækkandi seinastu árini, og henda gongdin heldur fram í 2021. Skattaprosentið í miðal er nú 20,12%, hetta er ein lækking á 0,07% í mun til 2020. Skattaprosentið lækkaði í seks kommunum og hækkaði í trimum kommunum. Lækking var í Hovi á 2%, í Skálavík á 1% og í Vági á 0,15%. Í teimum trimum kommunum, Fuglafjarðar-, Vestmanna- og Runavíkar-, lækkaði skattaprosentið við 0,25%. Hinvegin hækkaði skattaprosentið í Hvalba (1%), Kunoy (0,25%) og Kvívík (0,25%).

Barnafrádrátturin hækkaði í trimum kommunum í 2021. Hækking á 1.000 kr. í Sunda kommunu og á 500 kr.

**Talva 5**

Inntøkur hjá kommunum

| | R2018 | R2019 | M2020 |
|---|---|---|---|
| Kommunuskattur | 1.896 | 2.041 | 2.107 |
| Felagsskattur | 163 | 159 | 170 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 352 | 398 | 409 |
| Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir | 113 | 109 | 108 |
| **Tilsamans** | **2.524** | **2.707** | **2.794** |

**Talva 6**

Vøkstur í inntøkum hjá kommunum

| | Vøkstur 2019 í mió. kr. | Vøkstur 2019 í % | Vøkstur 2020 í mió. kr. | Vøkstur 2020 í % |
|---|---|---|---|---|
| Kommunuskattur | 145 | 7,6% | 66 | 3,3% |
| Felagsskattur | -4 | -2,2% | 11 | 6,7% |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 46 | 13,1% | 11 | 2,8% |
| Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir | -4 | -3,9% | -1 | -0,7% |
| **Tilsamans** | **183** | **7,2%** | **87** | **3,2%** |

**Talva 7**

Kommunuskattaprosent og barnafrádráttur í 2020–2021

| | Kommunuskattaprosent | | | Barnafrádráttur (kr. árliga pr. barn) | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Kommuna** | **2020** | **2021** | **Munur** | **2020** | **2021** | **Munur** |
| Fugloyar kommuna | 16,00 | 16,00 | | 10.000 | 10.000 | |
| Skúvoyar kommuna | 16,00 | 16,00 | | 8.000 | 8.000 | |
| Fámjins kommuna | 16,00 | 16,00 | | 7.000 | 7.000 | |
| Hovs kommuna | 20,00 | 18,00 | -2,00 | 7.500 | 8.000 | 500 |
| Kunoyar kommuna | 18,50 | 18,75 | 0,25 | 7.000 | 7.000 | |
| Eiðis kommuna | 18,75 | 18,75 | | 7.500 | 7.500 | |
| Sumbiar kommuna | 19,00 | 19,00 | | 6.000 | 6.500 | 500 |
| Tórshavnar kommuna | 19,00 | 19,00 | | 8.000 | 8.000 | |
| Hvannasunds kommuna | 19,75 | 19,75 | | 7.000 | 7.000 | |
| Viðareiðis kommuna | 20,50 | 20,50 | | 7.500 | 7.500 | |
| Nes kommuna | 20,50 | 20,50 | | 5.500 | 5.500 | |
| Klaksvíkar kommuna | 20,75 | 20,75 | | 5.500 | 5.500 | |
| Sands kommuna | 20,75 | 20,75 | | 8.500 | 8.500 | |
| Hvalbiar kommuna | 19,75 | 20,75 | 1,00 | 6.500 | 6.500 | |
| Porkeris kommuna | 20,75 | 20,75 | | 7.500 | 7.500 | |
| Tvøroyrar kommuna | 20,90 | 20,90 | | 7.000 | 7.000 | |
| Eystur kommuna | 21,00 | 21,00 | | 8.000 | 8.000 | |
| Sjóvar kommuna | 21,00 | 21,00 | | 7.000 | 7.000 | |
| Kvívíkar kommuna | 20,75 | 21,00 | 0,25 | 5.100 | 5.100 | |
| Sørvágs kommuna | 21,00 | 21,00 | | 6.000 | 6.000 | |
| Skopunar kommuna | 21,00 | 21,00 | | 6.000 | 6.000 | |
| Skálavíkar kommuna | 22,00 | 21,00 | -1,00 | 6.000 | 6.000 | |
| Húsavíkar kommuna | 21,00 | 21,00 | | 6.000 | 6.000 | |
| Fuglafjarðar kommuna | 21,50 | 21,25 | -0,25 | 7.500 | 7.500 | |
| Vestmanna kommuna | 21,50 | 21,25 | -0,25 | 5.000 | 5.000 | |
| Runavíkar kommuna | 21,75 | 21,50 | -0,25 | 8.000 | 8.000 | |
| Sunda kommuna | 21,50 | 21,50 | | 5.000 | 6.000 | 1.000 |
| Vágs kommuna | 21,65 | 21,50 | -0,15 | 5.500 | 5.500 | |
| Vága kommuna | 22,00 | 22,00 | | 5.500 | 5.500 | |
| | | | | | | |
| Hægsta | 22,00 | 22,00 | 0,00 | 10.000 | 10.000 | 0 |
| **Miðal** | **20,19** | **20,12** | **-0,07** | **7.071** | **7.165** | **94** |
| Lægsta | 16,00 | 16,00 | 0,00 | 5.000 | 5.000 | 0 |

í Hovs og Sumbiar kommunum. Barnafrádrátturin er nú í miðal 7.165 kr. árliga pr. barn undir 18 ár.

Grundarlagið undir kommunuskattinum er rættiliga ymiskt kring landið. Tað, sum serliga kann minka um grundarlagið undir kommunuskattinum er, um nógvir pensjónistar búgva í kommununi, tí fólka- og fyritíðarpensjón eru næstan skattafrí. Men eisini hevur tað stóra ávirkan, um nógv arbeiða uttanlands ella eru undir serskipanum sum FAS og DIS.

# Felagsskattur

Sambært § 5 í ásetingarlógini fellur 70% av felagsskattinum til landið og 30% til kommunurnar. Skatturin fellur ymiskt, alt eftir hvar í landinum feløg eru heimahoyrandi. Tó rinda peningastovnar, tryggingarfyritøkur, telesamskiftisfyritøkur, oljusølufyritøkur og vinnurekandi grunnar skatt til allar kommunur.

Tað er sera ymiskt, hvussu felagsskatturin hilnast kommununum. Seinastu árini hava serliga tær kommunur, har alivirksemi er, og har uppsjóvarfeløg eru heimahoyrandi, fingið væl av inntøku. Mestu inntøku pr. íbúgva í 2020 fingu Runavík og Fuglafjørður, har inntøkan var meira enn 10 tús. kr. fyri hvønn íbúgva. Hinvegin fingu tær kommunur, har inntøkan var minst, niður ímóti 400 kr. pr. íbúgva. Miðal fyri alt landið var 3.250 kr. fyri hvønn íbúgva í 2020.

# Skattur av eftirlønarinngjøldum

Sambært §12, stk. 1 í eftirlønarlógini fellur skatturin av inngjøldum til pensjón til kommunurnar eftir talinum av persónum 67 ár ella eldri. Tó so, at talið av borgarum 67 ár ella eldri í Sandoy verður hækkað við 30%.

Skatturin fellur serliga til tær kommunur, har nógv eldri búgva, og tað eru yvirhøvur kommunur í Suðuroy og Sandoy. Mest pr. íbúgva í 2020 fór til Húsavíkar kommunu við næstan 21 tús. kr. fyri hvønn íbúgva. Minst fekk Viðareiðis kommuna við gott 6.800 kr. fyri hvønn íbúgva. Miðal fyri landið var umleið 8.250 kr. fyri hvønn íbúgva.

# Afturbering vegna DIS, FAS og frádráttir

Í sambandi við at kommunurnar yvirtóku eldraøkið frá 1. januar 2015 var ásett í *løgtingslóg nr. 136 frá 19. desember 2014 um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir,* at kommunurnar árliga fáa eina upphædd, ið samsvarar við 19,1% av:

- DIS-inntøku
- FAS-inntøku
- Fiskimannafrádráttinum (§ 25a)
- Uttanlandsfrádráttinum (§ 25b)

Endurgjaldið verður latið kommunum eftir bústaði hjá viðkomandi skattgjaldara.

Nógv mest í 2020 fekk Skálavíkar kommuna við næstan 7.900 kr. fyri hvønn íbúgva. Minst fingu Hovs og Skúvoyar kommunur við umleið 750 kr. fyri hvønn íbúgva. Í 2020 var talan um í miðal 2.070 kr. fyri hvønn íbúgva.

**Talva 8**

Kommunuskattur pr. íbúgva í 2020



**Talva 9**

Felagsskattur pr. íbúgva í 2020



**Talva 10**

Eftirlønarskattur pr. íbúgva í 2020



**Talva 11**

Afturbering pr. íbúgva í 2020



**Talva 12**

Inntøkur samanlagt pr. íbúgva í 2020



# 11. Rakstrarútreiðslur

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununum verða mettar til umleið 2.124 mió. kr. í 2020. Í 2019 vóru samlaðu rakstrarútreiðslurnar 2.009 mió. kr.
*Sí talvu 13.*

Vøksturin var 115 mió. kr., ið samsvarar við 5,7%. Orsakirnar til henda rættiliga stóra vøksturin vóru ymiskar. Umleið helvtin av vøkstrinum stavaði frá hækkingum í almennu sáttmálalønunum, sum eru hækkaðar nógv seinastu árini. Harumframt hevði stóri fólkavøksturin við sær ein vøkstur í rakstrarútreiðslunum. Fólkavøksturin var heili 1,6% í 2020. Eisini hevði korona við sær øktan rakstur, bæði til lønir og til keyp av vørum og tænastum.
*Sí talvu 14.*

Eitt týðandi íkast til vøksturin stavaði frá, at útreiðslurnar til kommunal virki øktust við heilum 25 mió. kr., ið samsvarar við 25,7%. Hetta hevði við sær eitt íkast til samlaða rakstrarvøksturin á heili 1,3%. Uttan hetta hevði vøksturin sostatt verið 4,4% heldur enn 5,7%. Høvuðsorsøkin til vøksturin innan kommunal virki var tann, at kommunur rindaðu sín part av verkætlanini, Talgildu Føroyar. Men eisini minni inntøkur hjá havnum, tá korona minkaði um talið av vitjandi skipum, økti um raksturin av kommunalum virkjum.

**Talva 13**
Samlaðar rakstrarútreiðslur hjá kommunum

| | R2018 | R2019 | M2020 |
|---|---|---|---|
| Kommunal fyrisiting | 203 | 218 | 229 |
| Almanna- og heilsumál | 634 | 666 | 694 |
| Børn og ung | 405 | 445 | 462 |
| Undirvísing | 141 | 140 | 145 |
| Mentan og frítíð | 131 | 131 | 141 |
| Teknisk mál | 261 | 262 | 282 |
| Kommunal virki | 84 | 99 | 124 |
| Íbúðarmál | 36 | 36 | 35 |
| Rentur | 27 | 13 | 12 |
| **Tilsamans** | **1.923** | **2.009** | **2.124** |

**Talva 14**
Samlaður vøkstur í rakstrarútreiðslum

| | Vøkstur 2020 í mió. kr. | Vøkstur 2020 í % | Vakstraríkast 2020 |
|---|---|---|---|
| Kommunal fyrisiting | 11 | 4,8% | 0,5% |
| Almanna- og heilsumál | 27 | 4,1% | 1,4% |
| Børn og ung | 17 | 3,9% | 0,9% |
| Undirvísing | 6 | 4,2% | 0,3% |
| Mentan og frítíð | 10 | 7,5% | 0,5% |
| Teknisk mál | 20 | 7,6% | 1,0% |
| Kommunal virki | 25 | 25,7% | 1,3% |
| Íbúðarmál | 0 | -0,8% | 0,0% |
| Rentur | -1 | -8,5% | -0,1% |
| **Tilsamans** | **115** | **5,7%** | **5,7%** |

# 12. Íløgur

Kommunalu íløgurnar hava verið søguliga stórar seinastu árini. Samanlagt var talan um 894 mió. kr. í 2020, og í 2019 var talan um 872 mió. kr.
*Sí talvu 15.*

Stóru íløguøkini seinnu árini eru havnir og skúlar. Serliga stóra havnarútbyggingin í Tórshavn sæst aftur, men eisini eru munandi havnaríløgur gjørdar í Runavík seinastu árini. Harumframt eru stórar íløgur í skúlar í Tórshavn, Klaksvík, Fuglafirði og í Sunda kommunu. Eisini er ein nýggjur umlættingardepil bygdur í Hoyvík.

Annars eru seinnu árini eisini gjørdar stórar íløgur á ítróttaøkinum. Íløgur í ítróttaanlegg eru gjørdar á Eiði, Vági, Klaksvík, Fuglafirði, Tórshavn og í Sundalagnum.

**Talva 15**

Samlaðar íløgur hjá kommunum

| | R2018 | R2019 | M2020 |
|---|---|---|---|
| Kommunal fyrisiting | 3 | 22 | 8 |
| Almanna- og heilsumál | 10 | 39 | 95 |
| Børn og ung | 22 | 58 | 50 |
| Undirvísing | 151 | 215 | 233 |
| Mentan og frítíð | 119 | 108 | 79 |
| Teknisk mál | 184 | 217 | 237 |
| Kommunal virki | 223 | 213 | 192 |
| **Tilsamans** | **713** | **872** | **894** |

# 13. Fíggjarstøðan

Mett verður, at samlaða nettoskuldin hjá kommununum var umleið 664 mió. kr. við ársenda í 2020. Tá nettoskuldin verður gjørd upp, verða tøkur peningur og onnur fíggjarlig áogn drigin frá bruttoskuldini.

Nettoskuldin er av serliga stórum áhuga í kommunalum høpi, tí hon ger av, í hvønn mun kommunan kann upptaka skuld. Í § 43, stk. 2 í kommunustýrislógini er ásett, at:

> »Er nettoskuldin meira enn ein álíkning eftir einum av landsstýrismanninum árliga ásettum skattaprosenti, krevst loyvi frá landsstýrismanninum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum«.

Tað vil siga, at er nettoskuldin omanfyri eina álíkning, kann kommunan ikki sjálv ráða yvir sínum skuldarviðurskiftum. Við ársenda í 2019 lá Vágs kommuna eitt lítið vet omanfyri markið, allar hinar lógu væl niðanfyri. Men við ársenda í 2020 verður mett, at Vágs kommuna nú er komin undir skuldarmarkið. Nú er sostatt ongin kommuna omanfyri eina álíkning í skuld, og tað má sigast at vera søguligt.

Kommunala skuldin hevur í nógv ár verið í minking. Men í sambandi við at hall nú hava verið tvey ár á rað, er skuldin økt eitt vet. Í miðal samsvarar nettoskuldin nú við 28% av eini álíkning við skattaprosentið á 23%.

Skuldarstøðan hjá kommunum hevur sjáldan verið so góð sum nú. Samlaða nettoskuldin samsvarar við einans 3% av BTÚ. Fyri 10 árum síðani var talan um 6% av BTÚ, og verður farið aftur til 1998, var talan um heili 16% av BTÚ. Samlaða nettoskuldin er sostatt lág í mun til støddina á búskapinum.

Eisini kann staðfestast, at nú eru ongar kommunur, sum hava heilt stóra skuld. Fyri 20 árum síðani vóru fleiri kommunur, sum skyldaðu fleiri ferðir eina álíkning.

Fíggjarstøðan hjá kommununum má tí samanumtikið sigast at vera søguliga góð.


Mynd: Ólavur Frederiksen, faroephoto

# 14. Gongdin í fólkatalinum

Vøksturin í fólkatalinum, sum byrjaði í 2013, sær út til at halda fram, og fólkatalið er nú farið upp um 53.000. Tað er vaksið við meira enn 5.000 síðan 2013, og hetta samsvarar við 10,5%. Í miðal er fólkatalið vaksið við 630 árliga, sum samsvarar við 1,3% árliga.

Men vøksturin hevur verið rættiliga ójavnt býttur millum kommunurnar. Sum heild kann sigast, at mesti vøksturin er í Streymoy, Eysturoy og í Vágum. Í Norðoyggjum er sum heild vøkstur, men hann má sigast at vera nakað minni enn í miðstaðarøkinum. Í Suðuroy og Sandoy er vøksturin lítil, og minking er í fleiri kommunum

Annars verður víst til ársfrágreiðingina fyri í fjør, har ein rættiliga umfatandi útgreining av gongdini í fólkatalinum varð gjørd fyri hvørt øki í landinum.

**Talva 16**

Gongdin í fólkatalinum í kommununum síðan fólkavøksturin byrjaði í 2013

| Kommuna | Fólkatal 01.mar.13 | Fólkatal 01.mar.21 | Vøkstur 2013 til 2021 | Vøkstur í % 2013 til 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Tórshavnar kommuna | 19.831 | 22.436 | 2.605 | 13,1% |
| Klaksvíkar kommuna | 4.901 | 5.357 | 456 | 9,3% |
| Runavíkar kommuna | 3.757 | 4.250 | 493 | 13,1% |
| Eystur kommuna | 1.930 | 2.214 | 284 | 14,7% |
| Vága kommuna | 1.967 | 2.155 | 188 | 9,6% |
| Sunda kommuna | 1.637 | 1.813 | 176 | 10,8% |
| Tvøroyrar kommuna | 1.736 | 1.757 | 21 | 1,2% |
| Fuglafjarðar kommuna | 1.509 | 1.576 | 67 | 4,4% |
| Nes kommuna | 1.227 | 1.395 | 168 | 13,7% |
| Vágs kommuna | 1.301 | 1.388 | 87 | 6,7% |
| Vestmanna kommuna | 1.176 | 1.247 | 71 | 6,0% |
| Sørvágs kommuna | 1.087 | 1.230 | 143 | 13,2% |
| Sjóvar kommuna | 937 | 1.123 | 186 | 19,9% |
| Eiðis kommuna | 669 | 771 | 102 | 15,2% |
| Hvalbiar kommuna | 713 | 669 | -44 | -6,2% |
| Kvívíkar kommuna | 575 | 623 | 48 | 8,3% |
| Sands kommuna | 501 | 551 | 50 | 10,0% |
| Skopunar kommuna | 459 | 455 | -4 | -0,9% |
| Hvannasunds kommuna | 413 | 420 | 7 | 1,7% |
| Viðareiðis kommuna | 353 | 355 | 2 | 0,6% |
| Sumbiar kommuna | 362 | 348 | -14 | -3,9% |
| Porkeris kommuna | 318 | 319 | 1 | 0,3% |
| Kunoyar kommuna | 133 | 142 | 9 | 6,8% |
| Skálavíkar kommuna | 152 | 139 | -13 | -8,6% |
| Húsavíkar kommuna | 121 | 112 | -9 | -7,4% |
| Hovs kommuna | 115 | 100 | -15 | -13,0% |
| Fámjins kommuna | 105 | 82 | -23 | -21,9% |
| Skúvoyar kommuna | 43 | 41 | -2 | -4,7% |
| Fugloyar kommuna | 38 | 40 | 2 | 5,3% |
| **Alt landið** | **48.066** | **53.108** | **5.042** | **10,5%** |

# 15. Heildarætlan fyri rekruttering av starvsfólki til eldrarøkt og dagstovnar

Eldrarøkt og dagstovnaøkið eru nógv tey størstu økini í kommunala geiranum, bæði tá tað kemur til kostnað, og tá tað kemur til starvsfólk. Økini eru so stór samanlagt, at umleið 8. hvør løntakari í Føroyum starvast annaðhvørt á eldraøkinum ella dagstovnaøkinum. Talan er helst um tey økini í almenna geiranum, ið tað er torførast at rekruttera útbúgvin starvsfólk til í løtuni. Eisini má tíverri ásannast, at bæði økini eru útbúgvingarliga afturúrsigld, ikki bara í mun til restina av almenna geiranum, men eisini í mun til alt samfelagið.

Kommunufelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF) eru tí farin undir at gera eina heildarætlan fyri rekruttering av starvsfólki til eldrarøktina og dagstovnaøkið. Ætlanin er at lýsa núverandi støðu, meta um framtíðar tørv, og síðan koma við ítøkiligum tilmælum til, hvat kann gerast fyri at tryggja kommununum eina væl útbúna og motiveraða arbeiðsmegi framyvir. Eisini verður hugt at útbúgvingarmøguleikum og møguleikum fyri førleikamenning.

Hóast bæði økini í løtuni hava trupult við at rekruttera útbúgvin starvsfólk, so má tó sigast, at eldraøkið og dagstovnaøkið standa framman fyri hvør sínari avbjóðing, um hugt verður longur fram eftir. Tí meðan tað ikki eru útlit fyri nøkrum stórvegis vøkstri í barnatalinum sum frá líður – kanska heldur hinvegin – so kann staðfestast við vissu, at talið av eldri fólki fer at vaksa skjótt komandi árini.

Niðanfyri verður greitt frá núverandi støðu á dagstovnaøkinum og eldraøkinum, og sagt verður yvirskipað frá avbjóðingini framyvir.

## Dagstovnaøkið – núverandi støða

Á dagstovnaøkinum starvast samanlagt umleið 1.600 fólk, ið manna umleið 1.000 ársverk. Av hesum eru umleið 1425 námsfrøðilig størv, tað vil siga: námsfrøðingar og hjálparfólk.

**Talva 17**

Vøkstur í talinum av børnum í barnaansing seinastu 5 árini

| Øki | 2015 | 2020 | Vøkstur | Vøkstur í % |
|---|---:|---:|---:|---:|
| Norðoya sýsla | 508 | 629 | 121 | 24% |
| Eysturoyar sýsla | 1.064 | 1.343 | 279 | 26% |
| Streymoyar sýsla | 2.585 | 2.882 | 297 | 11% |
| herav Tórshavnar kommuna | 2.359 | 2.525 | 166 | 7% |
| Vága sýsla | 323 | 362 | 39 | 12% |
| Sandoyar sýsla | 94 | 91 | -3 | -3% |
| Suðuroyar sýsla | 373 | 359 | -14 | -4% |
| **Tilsamans** | **4.947** | **5.666** | **719** | **15%** |

Kelda: Hagstovan

**Talva 18**

Hvussu hevur tað – í kommununi sum heild – gingið at mannað leys størv á dagstovnaøkinum seinasta árið?

| | **Gingið væl** – nógv fólk at velja ímillum | **Í lagi** – men avmarkað úrval | **Ikki altíð lætt** – men fingið mannað størvini | **Trupult** – hava viðhvørt manglað fólk | **Sera trupult** – hava ofta manglað fólk |
|---|---:|---:|---:|---:|---:|
| Námsfrøðingar | 0 | 5 | 2 | 5 | 9 |
| Hjálparfólk | 2 | 8 | 7 | 2 | 0 |
| Vikarar | 1 | 5 | 6 | 8 | 0 |

Støðan á dagstovnaøkinum er nógv merkt av stóra fólkavøkstrinum, sum hevur verið seinastu árini. Tað hevur havt við sær, at talið av børnum, innskrivað á dagstovnaøkinum, er økt úr umleið 4.950 í 2015 upp í 5.670 í 2020. Ein øking á meira enn 700 børn, samsvarandi við 15%. Talið av børnum í Føroyum er nú søguliga høgt – hægri enn tað var fyrst í øldini – og vøksturin sær út til at halda fram í 2021.
*Sí talvu 17.*

Gongdin hevur havt við sær, at kommunurnar – umframt at útvega fleiri hølir – hava verið noyddar at seta nógv fleiri fólk. Samlaða starvsfólkatalið vaks við umleið 200 fólkum frá 2015 til 2020. Vantandi útboð av útbúnum námsfrøðingum hevur havt við sær, at talan í nógv mestan mun hevur verið um hjálparfólk.

Fyri at kanna støðuna nærri, hevur Kommunufelagið vent sær til allar tær 21 kommunurnar, ið hava dagstovnatilboð við soljóðandi spurningi: *Hvussu hevur tað – í kommununi sum heild – gingið at mannað leys størv á dagstovnaøkinum seinasta árið?*

Allar kommunur hava svarað, og úrslitið sæst í talvu 18.

Kanningin vísir, at tað er sera trupult at fáa til vega námsfrøðingar. Eisini er tað torført at finna vikarar. Hinvegin gongur tað væl betur at fáa hjálparfólk.

Heilar 9 kommunur (43%) hava sera trupult við at finna námsfrøðingar, og hava tí ofta manglað fólk. Í 5 kommunum (24%) er trupult at finna námsfrøðingar, og teir hava tí manglað viðhvørt. Tað vil siga, at samanlagt 14 av 21 kommunum (67%) hava torført við at fáa námsfrøðingar, og mangla tí fólk í ávís tíðarskeið.

Viðvíkjandi hjálparfólki gongur sum sagt lættari. Her hava bara 2 kommunur (Vestmanna og Tvøroyri) havt ilt við at finna fólk seinasta árið. Í 7 kommunum hevur tað ikki altíð verið lætt, men størvini vóru hóast alt mannað. Í 8 kommunum var støðan í lagi, men úrvalið var avmarkað. Í 2 kommunum (Klaksvík og Vági) hevur gingið væl við nógvum umsøkjarum at velja í millum.

Tá tað kemur til at manna vikarstørv, er støðan mitt í millum. Tað er truplari enn at fáa hjálparfólk, men lættari enn at fáa námsfrøðingar. Heilar 8 kommunur hava viðhvørt manglað vikarar.

Landafrøðiliga er ilt at fáa eyga á nakran samanhang í tølunum. Tað vísir seg, at kommunur í sama øki oftast svara rættiliga ymiskt. So tað ber ikki til at siga, at støðan er betri ella verri í ávísum økjum í landinum.

Støðan í Havn líkist støðuni í Føroyum sum heild. Har er sera trupult at fáa námsfrøðingar og trupult at finna vikarar, meðan tað er heldur lættari – men ikki lætt – at finna hjálparfólk. Sambært Tórshavnar kommunu hevur korona bøtt nógv um støðuna. Framman undan stóð á at finna hjálparfólk, men tá korona kom, gjørdist lættari, tí nú er kappingin við hotell- og matstovuvinnuna um tey ungu í arbeiðsmegini væl minni.

Støðan í Klaksvíkar-, Eystur-, Sjóvar- og Vágs kommunum má sigast at verða heilt góð. Har hevur gingið væl at funnið námsfrøðingar, og eisini hjálparfólk og vikarar.

Sí talvu 19.

**Talva 19**

Støðan á dagstovnaøkinum - Hvussu hevur tað – í kommununi sum heild – gingið at mannað leys størv á dagstovnaøkinum seinasta árið?



# Dagstovnaøkið – avbjóðingin framyvir

Sambært framskrivingum av fólkatalinum hjá Hagstovu Føroya eru ikki útlit til, at talið av børnum í Føroyum fer at vaksa nógv aftrat. Talið verður helst støðugt nógv ár framyvir, tó við teimum sveiggjum sum altíð eru í lítlum samfelagi við nógvari til- og fráflyting. Avbjóðingin á dagstovnaøkinum er tí ikki eitt stútt vaksandi starvsfólkatal, tí allarhelst verður starvsfólkatalið framyvir rættiliga støðugt á umleið sama stigi sum í dag.

Í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt er í § 7, stk. 4 ásett at: "Starvsfólkabýtið á dagstovnum skal í minsta lagi vera 2/3 til námsfrøðingatímar og í mesta lagi 1/3 til hjálparfólkatímar". Núverandi støða er langt frá landspolitiska málinum, tí ein uppgerð fyri 2020 vísir, at av samanlagt 922 námsfrøðiligum ársverkum eru einans 440 ársverk hjá námsfrøðingum, meðan 482 eru ársverk hjá hjálparfólki. Námsfrøðingaparturin er sostatt umleið 48% fyri landið samanlagt.

Tað er rættiliga ymiskt kring landið, hvussu stórur námsfrøðingaparturin er. Í 2020 var bara ein kommuna, har námsfrøðingaparturin var í minsta lagi 2/3. Tað var í Porkeris kommunu, har parturin var 75%. Í øllum øðrum kommunum var parturin minni enn 2/3. Í heili 5 kommunum var námsfrøðingaparturin enntá minni enn 1/3. Men í nógv flestu kommunum var talið umleið 50%.
*Sí talvu 20.*

Verður hugt at økjum í landinum sæst, at námsfrøðingaparturin er eitt vet undir 50% í flestu økjum. Minstur er parturin í Norðstreymoy/Sundalagnum, har hann er 35%. Størstur er parturin í Norðoyggjum við 55%.

Skal parturin hjá námsfrøðingum økjast úr núverandi 48% og upp í 67%, skulu umleið 250 ársverk flytast frá hjálparfólkapartinum í námsfrøðingapartin. Tá verður talan um 2/3 fyri landið samanlagt. Men skal tryggjast at námsfrøðingaparturin er omanfyri 2/3 á hvørjum einstøkum dagstovni, skal talið verða munandi hægri.

Seinastu 10 árini er talið av námsfrøðingum á dagstovnaøkinum einans økt við í miðal 13 námsfrøðingum árliga, og havandi í huga, at flestu námsfrøðingar á dagstovnaøkinum arbeiða niðursetta tíð, so er einans talan um 9-10 ársverk árliga. Við verandi gongd fara sostatt at ganga næstan 20 ár at røkka málinum.

Í eini komandi heildarætlan er ein týðandi partur av uppgávuni at lýsa, hvussu økið útbúgvingarliga, fakliga og tignarliga kann verða lyft, fyri at gera tað áhugaverdari hjá útbúnum námsfrøðingum og námsfrøðihjálparum at starvast á økinum.

# Eldraøkið – núverandi støða

Á eldraøkinum starvast umleið 1.650 fólk, og talan er um tilsamans góð 1.100 ársverk. Harav eru næstan 1.400 røktarstarvsfólk, ið arbeiða umleið 950 ársverk, ið samsvarar við 85% av øllum ársverkum á eldraøkinum.

Størsti bólkurin eftir sáttmála eru heilsuhjálparar, sum eru 782 í tali og manna 536 ársverk. Næstan helvtin (48%) av øllum ársverkum verða røkt av fólki, ið starvast sambært heilsuhjálparasáttmálanum. Av heilsuhjálparum hevur helvtin útbúgving sum heilsuhjálparar, meðan hin helvtin ikki hevur. Umleið 400 av tilsamans 1.382 røktarfólki hava sostatt ikki formliga røktarútbúgving. Hetta samsvarar við næstan 30%.

Hinir stóru fakbólkarnir eru heilsurøktarar og sjúkrarøktarfrøðingar. Heilsurøktararnir – 310 í tali - eru heldur fleiri enn sjúkrarøktarfrøðingarnir, sum eru 290 tilsamans. Av samlaðu ársverkunum standa heilsurøktarar og sjúkrarøktarfrøðingar fyri hvør sínum lítlum fimtaparti. Heilsurøktarar 19% og sjúkrarøktarfrøðingar 18%.
*Sí talvu 21.*

Kommunurnar yvirtóku økið í 2015, og síðan tá er starvsfólkatalið økt við umleið 10%. Vaksandi talið av eldri fólki hevur við sær, at økið støðugt hevur brúk fyri fleiri starvsfólki, serliga røktarstarvsfólki.

**Talva 20**

Støðan á dagstovnaøkinum

| | **Hjálparfólk** Ársverk | **Námsfrøðingar** Ársverk | **Íalt** Ársverk | **Námsfrøðingar** Ársverk í % |
|---|---|---|---|---|
| N. Streym og Sunda | 62,6 | 33,0 | 95,6 | 35% |
| Suðuroy | 30,1 | 24,5 | 54,6 | 45% |
| Vágar | 27,6 | 23,1 | 50,7 | 46% |
| Eysturoy | 115,5 | 102,5 | 218,0 | 47% |
| Sandoy | 9,5 | 8,7 | 18,2 | 48% |
| Tórshavn | 203,1 | 208,1 | 411,1 | 51% |
| Norðoyggjar | 33,5 | 40,2 | 73,7 | 55% |
| **Alt landið** | **481,9** | **440,0** | **921,9** | **48%** |

Eins og dagstovnaøkið hevur eldraøkið seinastu árini havt ilt við at finna útbúgvin fólk. Kommunufelagið hevur tí vent sær til tey 8 eldrasamstørvini við soljóðandi spurningi: *Hvussu hevur tað gingið at mannað leys størv á eldraøkinum seinasta árið?*
*Sí talvu 22.*

Sum heild vísir kanningin, at tað er trupult at manna økið. Størsta avbjóðingin er at finna útbúnar heilsuhjálparar og heilsurøktarar. Tað gongur heldur betur – men tó ikki lætt – at finna sjúkrarøktarfrøðingar og ófaklærd. Eisini er tað sum heild ein avbjóðing at finna vikarar/frítíðaravloysarar.

Serliga trupult er tað at finna útbúnar heilsuhjálparar. Heili 3 av teimum 8 eldraøkjunum hava sera ilt við at finna útbúnar heilsuhjálparar, og mangla tí ofta fólk. Í tveimum økjum er trupult at fáa útbúnar heilsuhjálparar, og tí mangla tey fólk viðhvørt. Tað vil siga, at samanlagt 5 út av 8 økjum hava trupult ella sera trupult við at finna útbúnar heilsuhjálparar.

Nakað tað sama ger seg galdandi fyri heilsurøktarar. Í tveimum økjum er sera trupult at finna heilsurøktarar og í trimum er tað trupult. Eins og fyri útbúnar heilsuhjálparar er tað sostatt trupult ella sera trupult í samanlagt 5 út av 8 økjum at finna heilsurøktarar.

**Talva 21**

Starvsfólk á eldraøkinum

| Sáttmáli | Ársverk | Ársverk | Fólk | Ársverk/fólk |
|---|---|---|---|---|
| Heilsuhjálparafelag Føroya | 536 | 48% | 782 | 0,69 |
| Heilsurøktarafelagið | 210 | 19% | 310 | 0,68 |
| Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar | 198 | 18% | 290 | 0,68 |
| Arbeiðsfólk | 64 | 6% | 150 | 0,43 |
| Føroyskir Fysioterapeutar og Ergoterapeutar | 37 | 3% | 50 | 0,74 |
| Starvsfelagið | 29 | 3% | 37 | 0,78 |
| Kost- og Føðslufelagið | 19 | 2% | 25 | 0,76 |
| Handverkarar/Maskinmeistarar | 13 | 1% | 13 | 0,97 |
| Føroya Pedagogfelag | 5 | 0% | 7 | 0,66 |
| Onnur | 10 | 1% | 10 | 0,96 |
| **Tilsamans** | **1.110** | **100%** | **1.664** | **0,67** |
| herav røktarstarvsfólk | 944 | 85% | 1.382 | 0,68 |

**Talva 22**

Hvussu hevur tað gingið at mannað leys størv á eldraøkinum seinasta árið?

| | **Gingið væl** – nógv fólk at velja ímillum | **Í lagi** – men avmarkað úrval | **Ikki altíð lætt** – men fingið mannað størvini | **Trupult** – hava viðhvørt manglað fólk | **Sera trupult** – hava ofta manglað fólk |
|---|---|---|---|---|---|
| Sjúkrarøktarfrøðingar | 1 | 2 | 2 | 2 | 1 |
| Heilsurøktarar | 0 | 2 | 1 | 3 | 2 |
| Heilsuhjálparar v/útb | 0 | 2 | 1 | 2 | 3 |
| Heilsuhjálparar u/útb | 0 | 3 | 1 | 2 | 1 |
| Vikarar/frítíðaravloysarar | 1 | 1 | 2 | 2 | 2 |

Eisini er tað ein avbjóðing at finna vikarar/frítíðaravloysarar. Helvtin av økjunum hava trupult ella sera trupult við at finna vikarar/frítíðaravloysarar.

Tað sær út til at verða lættari at finna sjúkrarøktarfrøðingar og ófaklærd. Men kortini eru framvegis 3 av 8 økjum, sum hava trupult ella sera trupult við at finna sjúkrarøktarfrøðingar og ófaklærd.

Verður hugt at úrslitinum landafrøðiliga, eru rættiliga stórir munir. Serliga stendur á í Havn, har sera trupult at fáa allar fakbólkar. Stutt sagt er stórur og varandi mangul upp á starvsfólk av øllum slag.

Hóast støðan er heldur frægari enn í Havn, eru eisini stórar avbjóðingar í Norðoyggjum.

Ein innanhýsis kanning millum deildarleiðarar í Norðoya Bú- og heimatænastu vísti, at 75% høvdu trupult ella sera trupult við at manna størvini, og sum heild var talan um allar starvsbólkar. Tó var serliga trupult at fáa heilsurøktarar og útbúnar heilsuhjálparar.

Í Sandoy er sera trupult at fáa til vega heilsurøktarar og útbúnar heilsuhjálparar, meðan tað gongur munandi lættari at seta sjúkrarøktarfrøðingar og vikarar/frítíðaravloysarar.

Eisini í samstarvinum, Roðanum, er trupult at fáa heilsurøktarar og útbúnar heilsuhjálparar, meðan tað gongur frægari at seta hinar starvsbólkarnar.

Hjá samstarvinum, VEKS, eru avbjóðingar av at fáa til vega sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar. Tað gongur frægari við hinum starvsbólkunum.

Í Suðuroy er støðan tann, at tey hava trupult við at fáa sjúkrarøktarfrøðingar og vikarar/avloysarar, meðan tað gongur betur við at fáa heilsurøktarar og útbúnar heilsuhjálparar. Nevnast kann, at ongin starvast sum heilsuhjálpari í Suðuroy uttan útbúgving. Uttan iva eitt úrslit av, at Heilsuskúlin liggur í Suðuroy.

Í eldrasamstarvinum, Nánd, er støðan sum heild góð, hóast tað hevur víst seg trupult at seta útbúnar heilsuhjálparar og vikarar/frítíðaravloysarar.

Frægast er støðan í Vágum, har tað gongur væl at útvega allar fakbólkar.
*Sí talvu 23.*

# Eldraøkið
# – avbjóðingin framyvir

Eldrarøktin má sigast at standa frammanfyri eini sera stórari avbjóðing. Roknað verður við stórum vøkstri í talinum av eldri borgarum framyvir, og longu nú vantar økinum starvsfólk – serliga útbúnar heilsurøktarar og heilsuhjálparar. Uppgávan er sostatt bæði at útvega fleiri hendur, og eisini at lyfta økið útbúgvingarliga.

Talið av fólki í teimum aldursbólkum, har nógv gerast røktarkrevjandi, veksur skjótt hesi árini og fer at gera tað nógv ár frameftir. Talið av fólki omanfyri 80 ár fer væntandi at vaksa við umleið 50% komandi 10 árini, og tað fer at tvífaldast komandi 20 árini. Tað vil siga, at verður

**Talva 23**

Støðan á eldraøkinum - Hvussu hevur tað gingið at mannað leys størv á eldraøkinum seinasta árið?





Mynd:Shutterstock

økið skipað á júst sama hátt sum í dag, og tænastustøðið verður óbroytt, so skulu um 10 ár starvast umleið 700 fleiri røktarstarvsfólk á eldraøkinum, og um 20 ár verða 1400 fleiri. Hetta er neyvan møguligt fíggjarliga, og tað ber neyvan heldur til at finna so nógv røktarstarvsfólk til økið.

Eisini má havast í huga, at økið longu nú er afturúrsiglt útbúgvingarliga, so við vaksandi starvsfólkatørvi verður tað ein uppaftur størri avbjóðing at lyfta fakið útbúgvingarliga og fakliga.

*Sí talvu 24.*

Samanumtikið má sigast, at vaksandi talið av eldri fólki er ein avbjóðing, ið krevur nýhugsan og nógvar íløgur, bæði í bygningar og tøkni. Eisini má verða hugt eftir, hvussu økið verður skipað og samskipað frameftir. Men hetta krevur eisini nýhugsan, tá tað kemur til útbúgving, fakliga menning og trivnað hjá røktarstarvsfólki. Økið má gerast meira áhugavert og spennandi at arbeiða innan framyvir. Í eini komandi heildarætlan er ein týðandi partur av uppgávuni at lýsa hesi viðurskifti.

**Talva 24**

Tal av fólki 80 ár og eldri

